


LANDSVERK

10. juni 2020

# INNIHALDSYVIRLIT

1. Samandráttur og tilmæli 3

2. Innleiðing 12

3. Bygnaður á Landsverki 13

4. Skipan og Menning 14

5. Fíggjardeildin – fíggjarstýring í miðdepilin 16

6. Deildin fyri infrakervi 22

7. Virkisdeildin -samvirkan av uppgávum 25

8. Møgulig útbjóðing av viðlíka- og vetrarhaldi 29

9. Leikluturin sum byggiharri 32

10. Stýring av størri verkætlanum 36

11. Umsiting av almennum bygningum 45

# SAMANDRÁTTUR & TILMÆLI

## - 10 MILLIÓNIR MEIRA TIL KJARNUVIRKSEMIÐ

Á sumri 2019 setti táverandi landsstýrismaður í samferðslumálum fram ynski um at fáa lýst og mett um virksemið hjá Landsverki. Partur av arbeiðssetninginum var at endurhugsa tilverugrundarlagið fyri stovnin.

Henda frágreiðing lýsir, hvussu leiðslan heldur, at kjarnuuppgávurnar skulu loysast.

### Høvuðsuppgávur

- *At halda landsins samferðslukervi herundir eisini vetrarhald,*
- *At virka sum byggiharri,*
- *At hava stórar verkætlanir hjá landinum um hendi,*
- *At røkja og viðlíkahalda landsins ognir,*
- *At framleiða tilfar til vegagerð.*

Landsverk er fest í høvuðsuppgávur stovnsins, men við hesum skjali vilja vit lýsa, hvussu vit skipa ein effektivari bygnað, sum alir fram ein hugburð og ein atburð, sum ger Landsverk til ein sterkari og meiri skikkaðan byggiharra, og umsitara av landsins ognum og felags samferðslukervi okkara.

### Skipanarligar avbjóðingar

Landsverk er merkt av relativt stórari umsiting, og av at mannagongdir ikki hava verið optimalar. Bygnaðurin verður rationaliseraður og umraðfestur, til ein meira tíðarhóskandi bygnað, so meiri peningur gerst tøkur til viðlíkahald.

Vit hava longu framt nakrar ábøtur við bygnaðarbroytingum, ið vóru framdar á nýggjárum. Innanhýsis hava vit havt avbjóðingar við fíggjarstýringini, har verkætlanarleiðarar hava stýrt fíggjarviðurskiftum á verkætlanum, hvør í sínum lagi, uttan at hetta hevur verið sjónligt í skipanunum hjá Gjaldstovuni. Hetta er nú rættað.

Landsverk skal verða ein skikkaður byggiharri, ið skal taka neyðugu leiðsluna og ábyrgdina av almennum byggiverkætlanum. Hetta merkir, at Landverk skal taka neyðuga myndugleikan í almennari bygging longu í fyrireikingini.

Stovnurin hevur ikki megnað hetta í nóg stóran mun í teimum størru verkætlanunum, ið vit hava havt ábyrgd av seinnu árini.

Høvuðsøkini, har vit fara at seta inn í stýringini av stórum verkætlanum, eru fullfíggjað fyrireiking, leypandi váðameting og neyv fíggjarstýring. Váðametingin, ið er eitt grundleggjandi amboð,

umfatar eina gjølla greining av umsitingarligum, búskaparligum og tekniskum váðum í allari tilgongdini frá fyrireiking til liðugtgerð.

Hesi átøk eru tó ikki nóg mikið. Ójavni er í bygnaðinum. Árliga rakstrarjáttanin til stovnin er 64,3 milliónir krónur í 2020. Á Landsverki eru 146 ársverk, harav starvast umleið 55 á høvuðsskrivstovuni í Havn.

Tá hugt verður nærri at býtinum millum lønir og virksemi sæst, at seinastu árini hevur verið ein øvugt gongd, har lønir hava verið hækkandi, meðan peningur brúktur til landsvegakervið og viðlíkahald, sum er ein kjarnuuppgáva hjá Landsverki, hevur verið lækkandi. Henda gongd kann ikki halda fram. Tí vil Landsverk tillaga og fokusera bygnaðin. Tað er okkara skylda, at tryggja, at borgarans peningur verður nýttur so skynsamt sum møguligt, og at so nógv sum møguligt fer til kjarnuvirksemið hjá Landsverki.

<u>Mynd 1</u>



Vit ætla at spara 10 milliónir árliga í rakstrinum, fyri at flyta teir pengarnar til kjarnuvirksemið hjá Landsverki og at innheinta viðlíkahaldseftirsleipið av landsvegum og bygningum. Átøkini eru fylgjandi:

- *Fyrisitingarligar sparingar.*
    - *Rationaliseringar, samanleggingar, umraðfestingar og automatiseringar*
- *Effektiviseringar á Virkisdeildini.*
    - *Tillaging og optimering í framleiðsluni*
- *Broytingar á infrakervi og í bygningsumsitingini.*
    - *Umraðfestingar og skift í fokus*
- *Umraðfestingar og umvælingar av almennum bygningum.*
    - *Færri og størri útboð*

Samanlagt merkir hetta, at starvsfólkahópurin minkar við 12 størvum. 8 fólk verða søgd úr starvi og 4 fara frá við náttúrligari frágongd. Øll á skrivstovuni hjá Landsverki í Tórshavn.

Hetta merkir, at vit uppá 10 ár kunnu brúka 100 milliónir meira uppá landsvegakervið og bygningar við somu játtan.

Innanhýsis hava vit sett skjøtul á eina útbúgvingarskipan, har starvsfólk skulu ígjøgnum eina innanhýsis útbúgving í stigum innan byggiharravirksemi og verkætlanarleiðslu. Ætlanin er eisini, at øll fyrisitingarstarvsfólk skulu víðarimennast við at gjøgnumføra eitt grundskeið, so øll hava eina felags fatan av, hvussu virksemið hjá Landsverki framyvir skal mennast.

## Samferðslukervið og raksturin av tí

Føroyska samferðslukervið er væl útbygt og landið hevur seinastu 70 árini lagt nógva orku í at knýta landið saman.

Landsverk skal umsita samferðslukervið á ein skynsaman hátt, soleiðis at tey verkløg (virðir), sum landið hevur bygt, verða varðveitt - og røkja tað soleiðis, at tað er trygt at ferðast millum býir og bygdir.

Kjarnuuppgávan er at vera landsins byggiharri og herundir at reka, viðlíkahalda og planleggja landsvegir, havnir, tyrlupallar og veðurstøðir. Landsverk er landsvegamyndugleiki og eisini myndugleiki á landshavnunum (Krambatangi, Gamlarætt, Skopun, rampin í Klaksvík og Syðradalur).

Størstu avbjóðingarnar á infrakervisøkinum seinastu nógvu árini er at halda landsvegirnar á einum nøktandi støði. Avbjóðingin er at fáa sum mest nyttu fyri játtanina.

Átøk at seta í verk fyri at náa hesum:

- *Umsitingin av infrakervi verður klænkað sambært omanfyristandandi.*
- *Spardir pengar verða settir av til sjónligt viðlíkahald sum t.d. at asfaltera meira, tøma veitir framvið vegnum, reinsa vegjaðaran, at skifta autoverju o.s.fr.*
- *Málið er at aðrar uppgávur, sum t.d. nýgerð av vegum, verða samlaðar í størri "pakkar" at veita út alment.*

Úrslitið av hesum verður, at samferðslukervið verður betri varðveitt.

Uppgávan hjá Landsverki er at halda landsvegakervið alt árið. Landsvegahaldið byggir á eina heildarhugsan, har sama tilfeingi – tað verði seg fólk og útgerð – verða nýtt til grótbrot, asfalt, viðlíkahald og vetrarhald.

Vit hava viðgjørt útbjóðing av hesum virksemi í frágreiðingini til Landstýrismannin. Í hesum sambandi hava vit hugt at, hvussu gjørt verður í grannalondum okkara.

Vetrarhaldið er ein týðandi partur av føroysku tilbúgvingini. Tí at talan er um trygd, so vil ein útbjóðing av hesum øki verða trupul, og tí er ætlanin ikki at gera broytingar í hesum í løtuni.

At varðveita verandi skipan merkir, at vit brúka okkara tilfeingi meiri effektivt. Vit hava eitt virkishjól, har vit hava arbeiði alt árið til tey fólk, sum fáast við vetrarhaldið.

### Framleiðslan

Framleiðsluparturin hjá Landsverki framleiðir og selir skotið og knúst grót, skildan og óskildan skerv og asfaltblandingar til kommunur, virkir og einstaklingar. Landsverk er sáttmálabundið at veita asfalt til undirsjóvartunlarnar fram til 2024, so ikki ber til at niðurleggja hetta virksemið uppá stutt sikt.

Tó eru avbjóðingar í hesum virksemi í dag. Framleiðslan er ikki nóg effektiv, m.a. tí at amboðsparkin er ov stór til endamálið, og tí at virksemið ikki hevur verið nóg væl skipað.

Ætlanin er at brúka næstu fýra árini at optimera framleiðsluna við at minka munandi um amboðsparkina, ið fyri ein part er niðurslitin og ótíðarhóskandi. Ætlanin er framhaldandi at hava trý grótbrot – Hundsáarbotnur, Hústoft og Porkeri. Tó vil man betra um lønsemið við at niðurleggja grótframleiðsluna til asfalt í Porkeri, tí at til ber at keypa tilfar munandi bíligari aðrastaðni frá. Vanlig grótframleiðsla til verandi nýtslu í Suðuroy heldur tó fram.

Profittmaksimering av framleiðslu av gróti, skervi og asfalt er endamálið, so at man um fýra ár kann taka støðu til, um alt virksemið – ella partar av tí - skal seljast. Hetta vil tryggja, at man fær best møguliga prísin fyri hetta virksemið.

### Stórar verkætlanir og leikluturin sum byggiharri

Eitt grundprinsipp má verða, at ábyrgd og heimildir fylgjast at. Eisini má tryggjast, at fyrireikingararbeiðið er liðugt, áðrenn nakað verður sett í gongd.

Hetta hevur ikki verið gjørt til fulnar í teimum stóru verkætlanum, ið Landsverk hevur havt um hendi. Her fremur man ábøtur í mannagongdum og samstarvsmodellum. Landsverk skal handla sum ein skikkaður byggiharri í allari tilgongdini.

Við einum greiðum leikluti hjá Landsverki, sum byggiharri av stórum verkætlanum, er umráðandi at stovnurin hevur greiðar mannagongdir fyri, hvussu slíkar skulu gjøgnumførast.
Vit hava, sum omanfyri nevnt, strammað upp innanhýsis mannagongdir.

Høvuðsøkini, har vit fara at seta inn í stýringini av stórum verkætlanum eru:

- *Fullfíggjað fyrireiking*
- *Leypandi váðameting*
- *Neyv fíggjarstýring*

Tí er av avgerandi týdningi, at Landsverk, sum byggiharri, setur týðilig og nágreinilig krøv til, hvat verkætlanin skal innihalda, áðrenn hon verður sett í verk.  Tað er í byrjanini, at tað ber best til at stýra kostnaðunum í verkætlanum, og at ganga broytingarynskjum á møti. Sí mynd 2 niðanfyri.

Mynd 2




Frá Professionelle bygherrers kompetenceudvikling, rapport hjá Byggeherreforeningen, s. 12

Ein annar trupulleiki hevur verið, at fíggjarætlan og verkætlan ikki altíð hava staðið mát við hvørt annað. Mong dømi eru um, at verkætlanir eru ófullfíggjaðar av tí sama. Slíkar verkætlanir setir Landsverk ikki í gongd.

Tað er umráðandi, at Landsverk brúkar tær heimildir, ið samsvara ábyrgdini sum byggiharri. Hetta merkir at kundarnir, sum eru ráðini, skulu geva síni íkast og seta fram síni ynskir, áðrenn verkætlanin fer í gongd. Kundarnir skulu virka fyri til at gera eina virkislýsing, sum er so fullfíggjað sum gjørligt. So skal Landsverk taka stafettina, og útføra arbeiðið í tráð við ta virkislýsing, sum er avtalað.

Tað vilja altíð verða óvissur við einari kostnaðarmeting av einari stórari verkætlan. Tilfar kann dýrka undir bygging, og teknisk ting kunnu stinga seg upp, meðan byggingin fer fram.

Sambært okkara royndum eru fyrstu 10% av kostnaðinum av einari verkætlan til fyrireiking. Hetta kann tykjast nógv, men royndirnar hava víst, at tað man hevur spart uppá fyrireiking í tí farna, er mist nógvar ferðir, tí stórar verkætlanir eru farnar av kós. Hesin samanhangur er stuðlaður av altjóða gransking (Frá Professionelle bygherrers kompetenceudvikling, rapport hjá Byggeherreforeningen, s. 12).

Sum omanfyri nevnt, so vil Landsverk afturat fullfíggjaðu fyrireikingini tryggja, at kostnaðarætlan og váðar verða mettir leypandi frá fyrsta degi.

Okkara tilmæli er, at Landsverk søkir Fíggjarmálaráðið um fígging, har man innroknar 10% afturat grundkostnaðin til fyrireiking, og harafturat leggur man 10% omaná í eitt óvissuískoyti. Hetta ískoyti kann bert gjaldast út, eftir at Landsverk sum byggiharri ger eina umsókn við einari frágreiðing um tey frávik, ið hava gjørt, at hetta verður neyðugt at útgjalda.

Tað sum vit hava sæð, við avskarvaðum upprunabudgettum, fyri bert at stápla eykajáttan omaná eykajáttan omaná hvørja aðra, er ikki nøktandi fyri nakran. Tí vilja vit mæla til, at man í framtíðini ger umsóknir eftir fylgjandi leisti, við íblástri úr danska Vejdirektoratet:

Mynd 3



## Umsiting av almennum bygningum

Umsitingin av almennum bygningum er eitt øki, sum er ov illa skipað í dag. Her hevur Landsverk ábyrgd av viðlíkahaldi, uttan at hava heimild at taka leigugjald, eins og tað privata fyri nýttu fermetrarnar hjá ymisku stovnunum. Her er aftur eitt dømi um, at ábyrgd og heimildir ikki fylgjast at.

Tað almenna eigur umleið 250.000 fermetrar av bygningum og leigar aðrar 40.000 fermetrar fyri góðar 40 milliónir árliga.

Ein samskipan, har Landsverk umsat allar bygningar og øll leigumál við heimild at kravt leigugjald, vildi tryggjað, at man umsat allar ognir og leigumál líka. Um ein stovnur í dag hevur ov nógvar fermetrar, og ein annar hevur ov fáar, so er tað eingin sjálvfylgja, at hetta verður samskipað. Heldur ikki er ein standardur galdandi, um hvussu nógv pláss hvør stovnur leigar pr. starvsfólk.

Um allir stovnar rindaðu eina lítla húsaleigu, so vildi henda rindað fyri neyðuga viðlíkahaldið. Um bygningarnir støðugt verða viðlíkahildnir fyri 46 milliónur krónur árliga, svarandi til 185 kr. fyri hvønn nýbygda fermetur, so vildi tað verið nóg mikið til at sloppið undan einari virðisminking og eini øking av viðlíkahaldseftirsleipinum.

Landsverk hevur eina verkætlan sum eitur Orkutak, har man í sínum viðlíkahaldi og íløgum í bygningar leggur seg eftir at minka um orkunýtslu í almennum bygningum.

Visjónin hjá Landsverki er í stuttum, at allir landsins bygningar skulu vera:

- *Í góðum standi*
- *Fult virkisførir*
- *Bíligir í rakstri*
- *Góðir at uppihalda seg í*
- *Tillagaðir til virksemið hjá brúkarunum*

Fyri at veita vissu fyri, at visjónin hjá Landsverki kann fremjast í verki, eru nakrar av loysnunum hesar:

- *Orkutak*
- *Skynsom nýtsla av fermetrum*
- *Umsjón við bygningunum*
- *Ræðisrætturin á leigumálum og bygningum eiga at samlast undir Landsverki*

Tað ber illa til at tryggja eina skynsama nýtlsu av fermetrum, so leingi sum ræðisrætturin og ábyrgdin av leigumálum liggja spjødd um øll aðalráðini. Okkara tilmæli er tí, at man gevur Landsverki ábyrgdina av landsins ognum og umsitingina av hesum ognum og leigumálum. Harafturat er okkara tilmæli, at man í fíggjarætlanunum fyri allar stovnar og ráð byggir eina lítla

húsaleigu inn, sum skal dekka viðlíkahald o.t. Hesin kostnaður má avhaldast óansæð, og fyri gjøgnumskygnið, so er best, at stovnar og ráð avhalda eina slíka leigu fyri teir fermetrar, ið tey brúka.

## Samandráttur og tilmæli

Innanhýsis átøk á Landsverki:

1. *Landsverk fer at spara 10 milliónir í rakstrinum um árið. Hetta merkir, umframt bygnaðarbroytingar og tillagingar, 12 størv færri á skrivstovuni í Havn.*
2. *Umsitingin av infrakervi verður klænkað og spardir pengar verða settir av til sjónligt viðlíkahald sum t.d. at asfaltera meira, tøma veitir framvið vegnum, reinsa vegjaðaran og at skifta autoverju.*
3. *Ætlanin er at brúka næstu fýra árini at optimera framleiðsluna og at betra um lønsemið í framleiðsluni, so at støða kann takast til eina sølu um fýra ár, tá ongar sáttmálabindingar eru.*
4. *Landsverk hevur framt og er í ferð við at fremja átøk, sum betra um førleikan innanhýsis. M.a. við at stovnseta eina interna útbúgvingarskipan, sum gevur starvsfólkunum betri førleikar til tær uppgávur, ið tey verða sett til framyvir.*
5. *Landsverk hevur framt broytingar, sum tryggja eina fullfíggjaða fyrireiking, eina leypandi váðameting, og eina neyva fíggjarstýring av verkætlanum.*
6. *Eisini verður borið so í bandi, at ein ríkisgóðkendur grannskoðari verður biðin um at gera ein leist fyri eina innanhýsis grannskoðan í Landsverki.*
7. *Krøvini til ráðgeving verða gjørd enn meiri týðilig. Miðað verður eftir at hava skikkaði innanhýsis starvsfólk, sum skulu hava verkætlanarleiðsluna av stórum verkætlanum.*
8. *Landsverk vil fyri eina og hvørja verkætlan tryggja, áðrenn nakað verður byrjað, at hon kann setast ígongd fyri tann fíggjarkarm, sum er ásettur.*

Onnur átøk:

1. *Heitt verður á Landstýrið at tryggja, ella broyta siðvenju, soleiðis at ráðini gera síni krøv galdandi í byrjanini av stórum verkætlanum, tá virkislýsingin verður gjørd, fyri síðani at lata Landsverk røkja sína uppgávu sum byggiharri, uttan at ógreitt er, hvør situr við ábyrgd og ávísingarrætti í verkætlanum. Ábyrgd og heimildir mugu fylgjast at.*
2. *Mælt verður til, at man broytir verklagsfíggingina, soleiðis, at 10% verða avsett til fullfíggjaða fyrireiking av verkætlanini. Harafturat er okkara tilmæli, at 10% verða løgd omaná sum óvíssuískoyti. Hetta ískoyti skal bert gjaldast út eftir umsókn við frágreiðing, um tað gerst relevant fyri eina verkætlan.*
3. *Mælt verður til, at Landsverk umsitur allar ognir landsins og leigumál. Skipanin í løtuni er í andsøgn við grundprinsippið um, at ábyrgd og heimildir eiga at fylgjast at. Ein felags umsiting av ognum, sum vit kenna tað t.d. úr Danmark, hevði tryggjað sparingar og munandi effektivari nýtslu av almennum fermetrum.*

4. *Mælt verður til, at almennir stovnar og ráð framyvir gjalda eina lítla húsaleigu fyri tær ognir, ið landið eigur, til viðlíkahald. Mett verður, at 185 kr. pr. fermetur pr. ár, vildi givið 46 milliónir, sum er nóg mikið fyri at sleppa undan virðisminking og viðlíkahaldseftirsleipi. Hetta hevði givið størri gjøgnumskygni í raksturin av almennum stovnum og ráðum.*
5. *Mælt verður til, at FMR saman við Landsverki ger nýggja roknskaparliga uppseting fyri raksturin í Fíggjarlógini, sum endurspeglar virksemið á stovninum í dag.*

Tórshavn 10/06/2020

Sigurd L. Lamhauge
Stjóri

# INNLEIÐING

Í samband við, at nýggjur stjóri varð settur á Landsverki í  oktober 2019, so var honum litið upp í hendi at endurhugsa tilverugrundarlagið fyri stovnin og gera eina ætlan fyri, hvussu uppgávurnar skulu loysast framyvir. Henda frágreiðing lýsir, hvat leiðslan á Landsverki heldur, at kjarnuuppgávurnar hjá Landsverki skulu verða, hvussu hesar skulu loysast, hvørjir førleikar krevjast, og hvussu best ber til at brúka tað tilfeingið, ið kann fáast til vega at loysa uppgávurnar.

Við hesum skjali vilja vit lýsa, hvussu vit skipa ein effektivari bygnað og ala fram ein hugburð og ein atburð, sum ger Landsverk til ein sterkari og meiri skikkaðan byggiharra og umsitara av landsins ognum og felags samferðslukervi okkara.

Frágreiðingin verður skipað soleiðis, at byrjað verður við bygnaðinum og yvirskipaðum viðurskiftum á stovninum, og so verður farið nærri inn á ítøkiliga virksemið við partsniðurstøðum fyri hvørt øki sær.



# BYGNAÐUR Á LANDSVERKI

Komið verður nærri inn á ítøkiligu uppgávurnar hjá Landsverki, men stutt uppsummerað kunnu høvuðsuppgávurnar setast upp sum niðanfyri:

- *At halda landsins samferðslukervi herundir eisini vetrarhald.*
- *At virka sum byggiharri.*
- *At hava stórar verkætlanir hjá landinum um hendi.*
- *At røkja og viðlíkahalda landsins ognir.*
- *At framleiða tilfar til vegagerð.*

Landsverk eigur at hava ein bygnað og eina umsiting, ið skal gera stovnin føran fyri at loysa sínar uppgávur á besta og bíligasta hátt.

Tá nýggi stjórin tók við í 2019, so bleiv bygnaðurin, í sambandi við arbeiðssetningin um at gera neyðugar tillagingar, í fyrsta umfari tillagaður til tann 1. Januar 2020, so at fimm deildir vóru skipaðar við deildarleiðarum undir stjóranum, umframt Samskiftisdeildina. Nú verður so ein tillaging gjørd afturat, soleiðis at Samskiftisdeildin verður niðurløgd sum deild. Ymsu deildirnar fáa ábyrgd av kunning á teirra øki, og onnur samskiftisráðgeving verður framyvir keypt uttanhýsis eftir tørvi.

Sostatt sær nýggi bygnaðurin soleiðis út:

<u>Mynd 4</u>




Byrjað verður við eini lýsing av Fíggjardeildini og Skipan og menning. Hesar deildir vóru fyrr ein deild, saman við maskinumsitingini, men nú er tað lagt út í tvær deildir. Roknskapur og búskapur er í sær sjálvum eitt tungt og krevjandi øki, og við tí fylgir ikki neyðturviliga kunnleikin um onnur sjálvstøðug øki. Tað er tí ikki ein natúrlig samanseting, at fígging og menning av starvsfólki eru undir somu leiðslu. Tí var støða tikin um at deila hesa deildina sundur í tvær deildir.

Hesar báðar deildirnar verða fyrst viðgjørdar. Tær tríggjar operativu deildirnar, Deildin fyri Infrakervi, Virkisdeild og Byggideildin verða viðgjørdar fyri seg seinni í frágreiðingini.

# SKIPAN OG MENNING



Deildin skal við vitan, skipanum og menning styðja uppundir, at Landsverk kann røkja sínar kjarnuuppgávur.

## Fyrisiting

Deildin hevur tvørgangandi fyrisitingarligar uppgávur, og hevur um hendi journal og skjalagoymslu, og er við upplæring og leiðbeining við til at menna og stuðla málsviðgerðina, og at skapa betri og skjótari málsviðgerð og eins gongd fyri somu sløg av málum. Harumframt avgreiðir deildin innlitsumbønir
Rakstur av skrivstovuni á Tinghúsvegum er eisini partur av fyrisitingini.

## Løgfrøði

Tey arbeiðsøki, sum løgfrøðiliga ráðgevingin umfatar, eru at menna eina standardisering av útboðum og sáttmálum, góðskutrygging, kunngerð um húsaskoðan, leiguøki, tryggingarøki, ABF06, AB18, Bygningskunngerðin 2017 og aðrar løgfrøðiligar uppgávur, sum t.d. trætumál vegleiðing og ráðgeving í ósemjum.
Eitt týðandi arbeiði hjá løgfrøðingum í løtuni, er at stuðla uppundir menning av Landsverk sum skikkaðan byggiharra.

## HTU

Innan heilsu, trygd og umhvørvi (HTU) hjá Landsverki verður arbeitt við at menna og tryggja skipaði viðurskifti innan trygd og arbeiðsumhvørvi hjá starvsfólkunum, umframt at fyribyrgja umhvørvisdálking.
Hetta verður m.a. gjørt við at skipa upplæring og leiðbeining og gera mannagongdir. At syrgja fyri, at allar HTU-fráboðanir verða viðgjørdar við fyribyrgjandi atlitum fyri eyga, og við at skipað verður fyri felags HTU-tiltøkum við ymiskum fokusøkjum.

## KT

Høvuðsuppgávan er at stuðla uppundir at Landsverk hevur røttu KT skipanir til at loysa kjarnuuppgávuna.
Í førum, har standardloysnir ikki finnast, mennir KT eindin loysnir í tøttum samstarvi við ta deild, sum skal brúka loysnina.

## HR

Innan HR, stuðlar og ráðgevur deildin leiðsluni. Harafturat er ein røð av uppgávum, ið yvirskipað hava til endamáls, at Landsverk støðugt mennir og fastheldur røttu starvsfólkini.

Á Landsverk arbeiða uml. 150 fólk, harav 55 starvast á skrivstovuni í Tórshavn. Umroknað til ársverk var talið 146 í 2019. Yvirlit yvir ymsur starvsbólkarnar er niðanfyri:

Yvirlit yvir starvsfólk, apríl 2020:

| | |
|---|---|
| *Akademikarafelagið* | 34 |
| *Búskapar- og løgfrøðingafelagið* | 8 |
| *Føroya Arbeiðarafelag* | 42 |
| *Føroya Handverkarafelag, privat* | 14 |
| *Føroya Handverkarafelag/Landsfelag Handverkaranna* | 20 |
| *Havnar Arbeiðarafelag, privat* | 5 |
| *Maskinmeistarafelag Føroya* | 7 |
| *Starvsmannafelagið* | 23 |
| *Tænastumannalíknandi* | 1 |
| *Tilsamans:* | **154** |

Eitt arbeiði er sett í gongd, sum í høvuðsheitum skal kanna førleikar hjá starvsfólki, sum møguligir verkætlanarleiðarar til størri verkætlanir, og hvørjir førleikar eru neyðugir at styrkja í hesum sambandi. Hetta fyri at kortleggja styrkir og veikleikar hjá Landsverki. Endamálið er partvíst, at myndin av stovninum úteftir verður styrkt, og partvíst at ávís viðurskifti viðvíkjandi førleika og starvsfólkamenning verða fingin í rættlag. Eitt týdningarmikið átak fyri at røkka hesum, er at seta eina innanhýsis útbúgvingarskipan í verk.

Tað eru millum annað staðfestir veikleikar í, hvussu verkætlanir hava verið stýrdar av Landsverki. Hetta verður nærri lýst seinni í frágreiðingini, men sigast kann her, at hesir veikleikar vísa hol í vitan og royndum hjá teimum, ið arbeiða við teimum ymisku verkætlanum.

Tað er ikki ávís fólk, sum verður víst til her, men skipanin sum heild og hugburður. Tískil er arbeiðið farið í gongd at finna hættir, sum menna og birta undir førleikar í verkætlanarleiðslu. Hetta inniheldur fyrireiking, at leggja arbeiðið til rættis og praktisk verkætlanarleiðsla.

Hetta er fyrst og fremst at styrkja verkætlanartilgongdina soleiðis, at øll lið, ið eru við í verkætlanini, hava eina felags fatan av, hvussu best skal farast fram. Ein innanhýsis útbúgving í verkætlanarleiðslu kemur at hava sum mál, at eingin partur av einari verkætlanartilgongd ikki verður væl stýrdur.

Landsverk hevur hugt at líknandi viðurskiftum í øðrum londum. Hetta fyribrigdið, sum samansetingin í stórum verkætlanum er, og hvussu skeiv verkætlanarleiðsla ávirkar, er granskað út í æsir í  nógvum londum, og tí ognar Landsverk sær vitan aðrastaðni frá, og setir hesa vitan í føroyskan samanhang.

Hetta kemur at geva starvsfólkum eina breiðari vitan og betri førleikar, soleiðis at vissast kann fyri, at framtíðar verkætlanir, stórar sum smáar, kunnu eydnast best møguligt.

Innanhýsis útbúgvingarskipanin skal fevna um øll starvsfólk, tí øll eiga at ogna sær eina grundleggjandi vitan um fakliga umhvørvið og virksemið á stovninum. Starvsfólk læra um meginreglur, arbeiðshættir og amboð, sum leggja lunnar undir proaktiva verkætlanarleiðslu.

Eitt er at ogna sær henda 'amboðskassan', men tað skulu førleikar til at velja, hvørji amboð skulu nýtast, og nær hesi amboð skulu nýtast. Harafturat verður eisini dentur lagdur á atburðin hjá verkætlanarleiðsluni og tær fakligu royndirnar, sum skulu til fyri at ein verkætlan skal eydnast. Ætlanin er at skipa útbúgvingina í ymiskum stigum frá A til D, har krøvini økjast so hvørt. Endamálið er, at partar av henni kunnu sertifiserast eftir altjóða leisti innan projektleiðslu – IPMA leistinum.

### Niðurstøða, tilmæli og átøk

Landsverk hevur framt og er í ferð við at fremja átøk, sum betra um førleikan innanhýsis. M.a. við at stovnseta eina interna útbúgvingarskipan, sum gevur starvsfólkunum betri førleikarnar til tær uppgávur, ið tey verða sett til framyvir.

# FÍGGJARDEILDIN – FÍGGJARSTÝRING Í MIÐDEPILIN

Fíggjardeildin tekur sær av fíggjarstýring, bókhaldi og innan- og uttanhýsis játtanareftirliti. Millum annað í sambandi við verkætlanarstýring og rakstrarætlanir. Harumframt hevur deildin ein ráðgevandi leiklut í fíggjarspurningum og skal tryggja, at leiðslan til einhvørja tíð hevur best møguligt grundarlag at taka støðu og avgerðir út frá og virka eftir.

Í strembanini eftir at kunna røkja fíggjar- og roknskaparviðurskifti á tryggasta og besta hátt framyvir, fær roknskaparøkið nú egna deild og verður til Fíggjardeildina.

Kjarnuøkið á eini Fíggjardeild er at framleiða ein rættan roknskap. Kjarnuuppgávurnar á nýggju Fíggjardeildini verða sostatt bókhald/roknskaparhald, fíggjarstýring og innanhýsis grannskoðan. Fíggjarstýringin og innanhýsis grannskoðanin verður raðfest hægri og ment saman við ríkisgóðkendum grannskoðara, meðan bókhaldið og roknskaparhaldið verður mett verandi á høgum støði.

Fíggjarliga virksemið verður stýrt á best møguligan hátt, um tað áhaldandi er í miðdeplinum hjá teimum, ið varða av økinum. Leiðarin skal hava hægri útbúgving innan búskap og førleikar at seta fíggjarliga virksemið á Landsverki í ein fyrisitingarligan og samfelagsligan karm. Harumframt eru førleikar at gera samfelagsligar árinsmetingar av fíggjarstýringini á stovninum neyðugir. Í

sambandi við størri verkætlanir, er neyðugt at fíggjarstarvsfólkini hava førleikar at fremja nágreiniligar og neyvar fíggjarligar váðametingar, soleiðis at hvørt frávik verður uppdagað í góðari tíð og viðgjørt.

Størri áherðsla verður løgd á innanhýsis eftirlit og 'controlling', har Fíggjardeildin framyvir bæði ger mánaðarroknskapir av øllum rakstrarstøðum og øllum verkætlanum. Størstu verkætlanirnar verða leypandi grannskoðaðar innanhýsis bæði ófráboðað og í samstarvi við verkætlanarábyrgdarar.

Leisturin til innanhýsis eftirlitið verður gjørdur saman við ríkisgóðkendum grannskoðara, soleiðis at vit tryggja okkum at góðskan er á nøktandi støði og vit koma allan vegin runt í eftirlitinum.

### Raksturin á Landsverki

Samlaði raksturin á Landsverki er settur saman av nógvum ymsum stovnsnumrum. Ígjøgnum tíðirnar eru deildir lagdar saman, sundurskildar, nýggjar stovnaðar og heil øki uttanifrá eru løgd inn at umsita. Raksturin á Landsverki í dag er óneyðuga sundurbýttur, sum ger hann torføran at gjøgnumskoða. Man hevur fult av tíðar- og orkukrevjandi innanhýsis bókingum, fyri at fáa alt at ganga upp og samsvara við fíggjarlógina.

Leiðslan ynskir at vísa ein rættan og gjøgnumskygdan roknskap, sum endurspeglar virksemið á Landsverki. Tað er torført við verandi bygnaði at náa hetta mál. Raksturin er, sum áður nevnt, samansettur av alt ov nógvum stovnsnumrum. Umframt hetta er eisini løgujáttanin "Umvælingar av almennum bygningum", sum í veruleikanum er rakstur. Somuleiðis liggur raksturin í "Trygdartiltøkunum", "Tunnilsliðið" og "Dagføringar av tunlum og brúm" undir løgukontuni "Nýggir Landsvegir". Hetta merkir, at um man vil fregnast hvussu gongst við rakstrinum, má man velja hvat skal við og ikki. Fakliga er tað als ikki nøktandi at framleiða tilfar burturúr hesum klútateppinum.

Tíðin er komin at Landsverk saman við FMR endurskoðar hetta økið, so vit fáa betri gjøgnumskygd. Ynskiligt er at savna allan raksturin og hava greiðari skilnað millum rakstur og løgur. Endamálið er at vísa ein rættan og gjøgnumskygdan roknskap.

Við nýggja bygnaðinum eru 5 deildir. Hesar deildir kundu haft hvør sítt stovnsnummar, tó við starvsfólkadeildini og fíggjardeildini undir einum. Dimensiónirnar undir stovnsnumrunum eru ikki liðugt viðgjørdar enn, og eru bert dømir um, hvussu roknskapurin framyvir kann skipast.

| Bygningaumsiting | Skrivstovan | Infrakervið | Virkisdeild |
|---|---|---|---|
| Umsiting | Umsiting | Umsiting | Umsiting |
| Oljugoymslur | Stjóri | Planlegging | Útinnan |
| Húsaleiga | Bókhald | Vanligt viðlíkahald | Skerverk |
| Leiga av økjum | HR/HTU/KT | Vetrarhald | Asfaltverk |
| Yvirtiknar ognir | Kunning | Asfaltering | Bitumengoymsla |
| Orkusparingar | | Ferðsludepil | Roydarstova |
| | | Havnir | Maskinumsiting |
| | | Tyrlupallar | |

Við 4 stovnsnumrum, sum mynda nýggja bygnaðin, ístaðin fyri aftur at gera eina broyting innanfyri verandi torgreiðu skipan, er væl skjótari og lættari hjá bæði Landsverki, myndugleikum og almenningini at fáa yvirlit. Flestu innanhýsis bókingar hvørva og roknskapurin gerst meiri gjøgnumskygdur.

Við nýggja yvirlitinum, sum eisini er lýst niðanfyri, verður lættari at fremja rationaliseringar og fullnýta stovnin á besta hátt. Møguligt verður við hesum yvirliti at fremja samanberandi greiningar við okkum sjálvi, aðrar stovnar í Føroyum og uttanlands, og seta krøv bæði innanhýsis og frá politiska myndugleikanum. Legg í geyma, at niðara køkan í myndini niðanfyri ikki neyðturviliga vísir veruleikan, tí býtið millum Virkisdeildina og Infrakervið í skrivandi stund ikki er endaliga liðugt, og at støddin á Byggideildini er relativ.

Mynd 5



Mynd 6




At gera fíggjarstýringina einfaldari er neyðugt, men tað er ikki nóg mikið. Ójavni er í bygnaðinum. Árliga rakstrarjáttanin til stovnin er 64,3 milliónir krónur í 2020. Á Landsverki eru 146 ársverk, harav starvast umleið 55 á høvuðsskrivstovuni í Havn.

Um hugt verður nærri at býtinum millum lønir og virksemi, so sæst, at seinastu árini hevur verið ein øvugt gongd, har lønir hava verið hækkandi, meðan peningur brúktur til landsvegakervið og viðlíkahald, sum er ein kjarnuuppgáva hjá Landsverki, hevur verið lækkandi. Henda gongd kann ikki halda fram. Tí vil Landsverk tillaga og fokusera bygnaðin. Tað er okkara skylda, at tryggja, at borgarans peningur verður nýttur so skynsamt sum møguligt, og at so nógv sum møguligt fer til kjarnuvirksemið hjá Landsverki.

Mynd 7




Samsvar eigur at verða millum umsiting og virksemi. Gongdin seinnu árini hevur verið ein øvugt gongd, har ein støðugt minni partur í prosentum er farin til kjarnuvirksemið hjá Landverki.
Vit ætla at spara 10 milliónir árliga í rakstrinum, fyri at flyta teir pengarnar til kjarnuvirksemið hjá Landsverki, og at innheinta viðlíkahaldseftirsleipið av landsvegum og bygningum. Átøkini eru fylgjandi:

- *Fyrisitingarligar sparingar.*
    - *Rationaliseringar, samanleggingar, umraðfestingar og automatiseringar*
- *Effektiviseringar á Virkisdeildini.*
    - *Tillaging og optimering í framleiðsluni*
- *Broytingar á infrakervi og í bygningsumsitingini.*
    - *Umraðfestingar og skift í fokus*
- *Umraðfestingar og umvælingar av almennum bygningum.*
    - *Færri og størri útboð*

### Niðurstøða, tilmæli og átøk

Landsverk fer at spara 10 milliónir í rakstrinum um árið. Hetta merkir, umframt bygnaðarbroytingar og tillagingar, 12 størv færri á høvuðssætinum.

8 fólk verða søgd úr starvi og 4 fara frá við náttúrligari frágongd. Øll á skrivstovuni hjá Landsverki í Tórshavn.

Hetta merkir, at vit uppá 10 ár kunnu brúka 100 milliónir meira uppá landsvegakervið og bygningar við somu játtan.

Tað verður komið nærri inn á ítøkiliga virksemið í lýsingini av ymsu deildunum og tey átøk, ið verða framd sum partur av omanfyristandandi.

Viðvíkjandi innhýsis mannagongdum, so verður borið so í bandi, at ein ríkisgóðkendur grannskoðari verður biðin um at gera ein leist fyri eina innanhýsis grannskoðan í Landsverki.

Viðvíkjandi rakstrinum, verður tilmælt at FMR og Landsverk finna eina nýggja roknskaparliga uppseting, sum endurspeglar virksemið á stovninum í dag.

# DEILDIN FYRI INFRAKERVI

Ein kjarnuuppgáva hjá Landverki er at vara av føroyska samferðslukervinum. Samferðslukervið umfatar í dag knappar 500 km av landsvegi, tunlar, brýr, byrgingar, havnir og tyrlupallar. Kervið er ein av grundsúlunum undir føroyska nútíðarsamfelagnum. Vegasamband er til allar bygdir og alsamt fleiri oyggjar eru knýttar saman við føstum sambandi.

477 km av vegum

17 vanligar tunlar

325 brúgvar

2 byrgingar

3 landshavnir

10 tyrlupallar

2 undirsjóvartunlar (myndugleiki)




Visiónin fyri samferðslukervið er "Føroyar – ein býur", tað vil siga at landið skal vera knýtt saman á ein hátt, sum ger at ferðatíðirnar í Føroyum kunnu samanberast við ein stórbý uttanlands. Til dømis gera tað møguligt at búgva einastaðni og arbeiða í aðrari bygd ella oyggj. Eisini skal frástøðan í tíð til ymisk tilboð, so sum handil, mentanartiltøk og frítíðarítriv verða soleiðis, at hóast tú í kilometrum býrt fjarskotið, skal tú hava atgongd til felagsskapin – og umvent, hóast tú býrt í einum av føroysku býunum, skalt tú hava stutt til nattúru og "bygdalív".

Hetta er ikki ein nýggj visión – seinastu umleið 70 árini er føroyska samfelagið púra broytt og eigur útbyggingin av infrakervinum, vegum, havnum og eisini tyrlupallum, ein stóran leiklut í hesum. Á ein hátt kann sigast, at at menningin av samfelagnum og av infrakervinum hava gingið hond í hond øll hesi árini – og soleiðis skal tað framhaldandi vera. Infrakervið skal eisini í framtíðini stuðla undir menning og trivnað kring alt landið.

Landsverk skal umsita landsins infrakervi á ein skynsaman hátt, soleiðis at tað til eina og hvørja tíð røkkur endamálinum. Uppgávan er at varðveita tey verkløg og virðir, sum landið hevur bygt - og røkja tað soleiðis, at tað er trygt at ferðast ímillum býir og bygdir. Landsverk er vegamyndugleiki landsins og eisini myndugleiki á landshavnunum.

Infrakervisdeildin stendur fyri hesi uppgávuni hjá Landsverki. Kjarnuuppgávan er at vera landsins byggiharri og vegamyndugleiki, herundir at reka, viðlíkahalda og planleggja landsvegir, havnir og tyrlupallar. At stuðla undir kjarnuuppgávuni, eru harafturat nakrar umráðandi funktiónir: ferðsluupplýsing/trafikcentral (veður, alda, ferðsla og koyrilíkindir), tilbúgving og planlegging av infrakervinum.

Infrakervisdeildin hevur tvey høvuðsfokusøkir – at varðveita landsins infrakervi og tryggja ferðsluna á tí – nú og í framtíðini.

At varðveita landins infrakervi er at tryggja vegakapitalin, at tryggja at tær íløgur landið hevur lagt í infrakervið verða væl umsitnar og ikki forfalla.

At tryggja ferðsluna er grundarlagið undir at knýta landið saman, tað skal bera til at ferðast trygt millum býir og bygdir. Eitt vælrikið og viðlíkahildið infrakervi gevur trygd. Vetrarhaldið og ferðslutrygdartiltøk, hóskandi skelting og vegamerking er eisini við til at gera ferðsluna tryggari. Í stuttum kann sigast at uppgávan, at vera landsvegamyndugleiki er at umsita landsvegirnar og umfatar tær uppgávurnar, sum eru nevndar í landsvegalógini og eisini eru uppgávurnar í sambandi við landsvegir, havnir og tyrlupallar nevndar í fíggjarlógini.

At reka, viðlíkahalda og planleggja samferðslukervið, umfatar m.a.:

- *at kenna væl standin á øllum annleggum og vita, hvat skal til fyri at varðveita hetta.*
- *at skipa fyri at grundraksturin er nøktandi so kervið fungerar eftir ætlan.*
- *at raðfesta viðlíkahaldsuppgávur so standurin á annlegginum ikki fellur.*
- *at skipa og planleggja tá nýggj annlegg skulu gerast ella verandi annlegg skulu umvælast, at gera kravfestingar um hvat skal gerast, hvussu tað skal gerast og til hvønn standard. At vera byggiharri á infrakervisverkætlanum.*

Tilknýttar uppgávur ella stuðulsfunktiónir eru:

- *Savnan og viðgerð av veður-, aldu- og ferðsludátum.*
- *GIS skrásetingar (m.a. at nýta sum planleggingar- og viðlíkahaldsamboð).*
- *Uppmátingar á sjógvi og landi.*
- *Vitar og siglingarleiðir (teir vitar og siglingarleiðir landið hevur ábygd av).*

Tær fyrisitingarligu uppgávurnar eru málsviðgerð:

- *Sum vegamyndugleiki:*
    - *At seta treytir til skelting og avmerking í samband við vegarbeiðir.*
    - *At viðgera og geva graviloyvir í og við landsveg.*
    - *At góðkenna íbindingar í landsveg.*
    - *At vera hoyringspartur í byggimálum framvið landsveg (byggilinjur).*
    - *At góðkenna t.d. undirsjóvartunlarnar, myndugleikaeftirlit.*
    - *At viðgera ferðslumál sambært ferðslulóg og relevantum kunngerðum.*

- *Sum avvarandi av landsins havnum:*
    - *Vanliga málsviðgerð viðvíkjandi brúk av havnunum og treytir til skip o.o.*

- *Sum umboð fyri sjókortmyndugleikan (fyrr DK, nú US).*
    - *At gera sjóuppmátingar í samband við at dagføra dýpdarkort og sjókort (dáturnar verða latnar sjókortmyndugleikanum).*
    - *At viðgera og geva loyvi til sjókaðalar á firðum og sundum.*
- *Sum ábyrgdarhavari av landsins tyrlupallum, myndugleikin er hjá Statens Luftfartsvæsen:*
    - *At varveita byggilinjur og innflúgvingarlinjur.*
    - *at luttaka á árliga sýninum (sum SLV ger).*
- *At planleggja (gera lendisskipanir) á firðum og sundum og planleggja í samband við aling á sjónum (uppgávan hjá Landsverki er at skráseta aliøkir og áseta hvar tey kunnu vera).*

Harafturat koma eftirlitsuppgávur sum at hava eftirlit við kommunalum vitum, siglingarljósum og avmerkingum ogt hava eftirlit við og góðkenna ISPS havnir (trygdargóðkenning).

Tilbúgving er ein týdningarmikil uppgáva. Hon umfatar m.a. at standa fyri tilbúgvingini á landsins infrakervi og at samskipa og luttaka í tilbúgvingini hjá øðrum infrakervisumsitarum. Undir tilbúgving kemur eisini, at Landsverk skal samstarva við løgreglu og føroysku tilbúgvingina annars.

### Aðrar viðkomandi uppgávur

At vera ein fakligur, álítandi (og óheftur) tekniskur ráðgevi hjá politiska myndugleikanum í øllum tættum, ið viðkoma samferðslukervinum, og at vera ein aktivur luttakari í samfelagsbyggingini/menningini og samferðsluplanlegging annars. Landsverk skal eisini veita fakliga sparring og ráðgeving til kommunur.

Landsverk skal savna neyðugar dátur og hagtøl fyri støðugt at hava yvirblikkið og neyv fakta at grunda sítt virksemi og sínar tilráðingar á.

Í tann mun, tað er gagnligt, at luttaka í norðurlendskum og øðrum samstarvi og menningar-/granskingarverkætlanum á samferðslu og infrakervisøkinum fyri at halda stovnin fakliga ajour.

Deildin fyri Infrakervi hevur eisini ábyrgd av ferðsluplanlegging. At evna til eina og hvørja tíð at síggja hvat er neyðugt at gera nú og eisini at vita ella meta um, hvat liggur fyri framman, bæði uppá styttri og longri sikt.

Inanhýsis er uppbýtið, at Deildin fyri Infrakervi raðfestir hvørjar uppgávur skulu gerast (at tær røttu uppgávurnar verða gjørdar), meðan Virkisdeildin kann hugsavna seg um, hvussu tær vera loystar (fólk og maskinur).

### Niðurstøða, tilmæli og átøk

Ein avbjóðing seinnu árini er, at landsvegakervið er forfallið og, at man hevur eitt ávíst eftirsleip. Avbjóðingin í dag er, enn størri enn nakrantíð, at fáa sum mest nyttu fyri játtanina.

Í tráð við omanfyrinevndu ætlan at spara 10 milliónir um árið í rakstri á Landverki, so verður umsitingin av infrakervi klænkað, og spardir pengar verða settir av til sjónligt viðlíkahald sum t.d. at asfaltera meira, tøma veitir framvið vegnum, reinsa vegjaðaran, skifta autoverju o.s.fr.

# VIRKISDEILDIN – SAMVIRKAN AV UPPGÁVUM



Rakstraruppgávur hjá Landsverki vóru upprunaliga býttar millum tvær deildir, nevniliga Deildina fyri Infrakervi og Framleiðsludeildina, tó at ymisk felagsnýtsla var. Rakstur, viðlíkahald og vetrarhald á landsvegunum var skipað og stýrt av Deildini fyri Infrakervi, meðan vanlig framleiðsla á grótbrotum og asfaltverkum var stýrt og skipað av Framleiðsludeildini. Í dag er tað fysiska arbeiðið lagt í Virkisdeildina.

Virkisdeildin hevur í dag sítt virksemið innan trý kjarnuøki á stovninum:

- *Framleiðsla.*
- *Landsvegahaldið.*
- *Smiðja.*

### Framleiðsla

Landsverk framleiðir og selur skotið og knúst grót, skildan og óskildan skerv og asfaltblandingar til kommunur, virkir og einstaklingar.

Hjá Landsverki er bitumengoymsla til asfalt staðsett í Hósvík, grót- og skervframleiðslan í Hústoft, Hundsarabotni og í Porkeri, meðan tað verður framleitt asfalt í Hundsarabotni og aftur á Sundi eftir summarferiuna í 2020, eftir at verkið var afturlatið á heysti í 2019.

Framleiðslan av gróti og skervi fer til vanliga privatbrúkara og -virki, umframt ymsar verkætlanir kring landið, og ikki til stórar anleggsverkætlanir, har arbeiðstakarar vanliga sjálvir veita sær neyðuga tilfeingið. Sum dømi kann nevnast útbygging av Tórshavnar Havn, ið fær grót úr

Glyvursnesi, tunnilsarbeiði ella størri kommunalar útstykkingar. Hinvegin verður asfalt framleitt til arbeiði kring alt landið.
Framleiðslan hjá Landsverki er eitt sokallað inntøkufíggjað virksemi, og merkir hetta at allar fastar útreiðslur herundir útreiðslur til millum annað tólbuna, avskrivingar, maskinur og løn til starvsfólk verður goldið av teimum inntøkum, ið fáast frá sølu av gróti, skervi og asfalt.

Landsverk keypti í 2016 eitt asfaltverk á Sundi, ið var í sera ringum standi. Har vóru munandi ábøtur gjørdar á vári 2020, so verkið kann nýtast tey komandi árini. Landsverk hevur bundið seg til nakrar langtíðar sáttmálar fram til 2024, sum gera, at man hevur bundið seg til at veita asfalt og annað tilfar til kundan.

Framleiðsla av gróti, skervi og asfalti var ein natúrligur partur av virkseminum hjá Landsverki, tá stovnurin var arbeiðstakari á fleiri stórum verkætlanum. Men umráðandi er, at um Landsverk framhaldandi skal reka virksemið, at tað verður so effektivt sum gjørligt, og at man er kappingarførur, eisini í mun til tilfar, ið kemur uttanlands frá.

Framleiðslan er ikki nóg effektiv í dag, m.a. tí at amboðsparkin er ov stór til endamálið, og tí at virksemið ikki hevur verið nóg væl skipað.

Ætlanin er at brúka næstu fýra árini at optimera framleiðsluna við at minka munandi um amboðsparkina, ið fyri ein part er niðurslitin og ótíðarhóskandi. Ætlanin er framhaldandi at hava trý grótbrot – Hundsáarbotnur, Hústoft og Þorkeri. Tó vil man betra um lønsemið við at niðurleggja grótframleiðsluna til asfalt í Þorkeri, tí at til ber at keypa tilfar munandi bíligari aðrastaðni. Vanlig grótframleiðsla til verandi nýtslu í Suðuroy heldur tó fram.

Profittmaksimering av framleiðsluni er endamálið, so at man um fýra ár kann taka støðu til, um virksemið skal seljast. Hetta vil tryggja, at man fær best møguliga prísin fyri hetta virksemið.

### Landsvegahaldið
Størru eindirnar á landsvegahaldinum halda til í Kollafirði, Lambareiði og í Øravík, meðan tvær smærri halda til heiman á Sandi og norðuri á Hvannasundi.

Høvuðsuppgávurnar eru rakstrararbeiði innan landsvegahaldið og vetrartilbúgvingina. Kjarnuuppgávurnar á landsvegahaldinum eru m.a. at grava veitir, rudda vegskráar, mála vegstrikur, seta upp prestar og bilverju, meðan vetrartilbúgvingin er at salta vegir.

### Smiðjan
Til landsvegahaldið og vetrarhaldið er neyðugt við dugnaligum starvsfólki, bæði til umsiting, men eisini tey, ið hava kunnleika til maskinurnar. Harnæst er tað eisini ein fortreyt at neyðugu maskinurnar eru klárar – kanska serliga til veturin, men eisini til framleiðslu av gróti, skervi, og asfalt. Ein vissa fyri, at øll henda tunga og gamla maskinpark heldur tørn, eru starvsfólkini á smiðjunum kring landið.

## Betri og skynsamari rakstur

Virkisdeildin fer at virka fyri betri og skynsamari rakstri, nú verkligu uppgávurnar hjá Landsverki eru savnaðar saman. Ein kjarnuuppgáva hjá deildini er at hava ábyrgdina av øllum maskinum og viðlíkahaldseftirsleipið av teimum. Í høvuðsheitum er endamálið hjá deildini at fáa framleiðslu, rakstrar- og viðlíkahaldsuppgávur at virka enn betri, eins og vissa fyri, at maskinurnar eru undir sama taki.

Verandi støða er tann, at maskinurnar liggja undir ymsum deildum og verða ikki nýttar á besta hátt av tí, at fleiri maskinur standa ónyttar stóran part av árinum.

Farast skal tí undir at arbeiða fram ímóti fylgjandi málsetningum:

- Framleiðslan skal kunna tillaga seg til eftirspurningin á føroyska marknaðinum.
    - *Dagføra verkini í Hústoft, Hundsáarbotni, Sundi og Porkeri.*
    - *Farast skal undir at útvega fleiri mobilar eindir at framleiða grót og skerv.*
    - *Sleppa av við dupultari maskinpark, tvs. optimera verandi framleiðslu.*
- Landsvegahaldið  skal arbeiða meiri málrættað við bílegging av kjarnuuppgávum frá Infrakervi.
    - *Farast skal undir at gera avtaluseðlar, so tað er gjøgnumskygni, hvat deildin ger, og hvat tað kostar.*
    - *Dagføra/trimma maskinpark, tað vil siga planleggja arbeiði við færri maskinum til vanliga haldið.*
- Smiðjan kemur sum savnandi ábygdari av allari maskinparkini framhaldandi at servisera maskinparkina fyri framleiðsluna og landsvegahaldið.
    - *Fáa fleiri maskinir undir tak, fyri at minka um óneyðugt slit á maskinur, ið standa úti alt árið.*

Komandi støðan á Virkisdeildini kemur sostatt at taka støði í, at maskinur og starvsfólk í størri mun koma at arbeiða saman sum ein samlað eind. Virksemið innan landsvegahaldið og aðrar ítøkiligar uppgávur, kann í einum virkishjóli býtast upp í 3 ymisk høvuðsøki:

- *Vetrarhald*
- *Grótbrot/asfalt*
- *Viðlíkahald*

Myndin av virkishjólinum niðanfyri er vegleiðandi, tí virksemið ella tær ymsu uppgávurnar sjálvandi umskarast við hvørja aðra, soleiðis at tá eingin kavi er um veturin, ber til at arbeiða við øðrum uppgávum.

Mynd 8




Virkishjólið omanfyri vísir eitt virksemi, ið fremur vanligt viðlíkahald av vegum, heldur vegirnir fríar um veturin, og annars fremur vanligt viðlíkahald um ongin kavarudding er um veturin. Hetta er partur av eini heildarhugsan, sum gongur tvørtur um ymisk øki. Tað vil siga, at tá ið tørvur ikki er á einum arbeiði, ið man plagar at gera, skal fólk koma at luttaka í størri mun í øðrum uppgávum á arbeiðsplássinum enn áður.

## Niðurstøða, tilmæli og átøk

Ætlanin er at brúka næstu fýra árini at optimera framleiðsluna og at betra um lønsemið í framleiðsluni, so at støða kann takast til eina sølu um fýra ár, tá ongar sáttmálabindingar eru.

# MØGULIG ÚTBJÓÐING AV VIÐLÍKA- OG VETRARHALDI



Vanliga viðlíkahaldið av landsvegunum og vetrarhaldið av landsvegunum kunnu tykjast, sum verandi eins. Men avgerandi munurin er, at viðlíkahaldið av vegunum verður raðfest eftir tøkari fíggjarorku hvørt ár sær, meðan vetrarhaldið støðugt hevur eina høga raðfesting.

Høvuðsorsøkin til at tað illa ber til at niðurraðfesta ella spara í vetrarhaldinum er, at vetrarhaldið er ein týdningarmikil partur av føroysku tilbúgvingini og trygdini í føroyska samferðslukervinum. Av hesi somu orsøk er vetrarhaldið í Føroyum á sera høgum støði.

Støðan í dag er, at borgarin sum heild er væl nøgdur við vetrarhaldið, meðan tað meiri javnan kemur fyri, at borgarar siga frá um manglandi landsvegahald.

Fortreytirnar fyri útbjóðing av bæði landvegahaldinum og vetrarhaldinum eru tískil eitt sindur ymiskar. Landsvegahaldið er í ein ávísan mun fevnt av einum eftirsleipi innan brúgvar, tunlar, vegjaðarar og við sjónligum holum á vegunum, meðan vetrarhaldið er høgt raðfest og koyrir væl.

Spurningurin um hvørt landsvegahaldið og vetrarhaldið kann bjóðast út í fría kapping, verður við jøvnum millumbilum havdur á lofti. Landsverk hevur kannað møguleikarnar fyri útbjóðing av hesum uppgávum og í hesum arbeiði hevur verið hugt nærri at, hvussu grannalond okkara loysa sama spurning.

Landsverk hevur verið á vitjan í Íslandi og hevur harafturat hugt at einari størri frágreiðing frá universitetinum í Aalborg, sum viðgerð almenn útboð innan vegahald og líknandi í Danmark, Svøriki, Noregi og í Stórabretlandi.

## Fortreytir fyri útbjóðing

Skal virksemið á vegunum bjóðast út í almennum útboði, er neyðugt at nakrar grundleggjandi fortreytir eru loknar. Tær kunnu eitt nú vera hesar:

| |
|---|
| *Útbjóðing hevur við sær betri góðsku* |
| *Raksturin gerst bíligari* |
| *Raksturin verður betri stýrdur* |
| *Marknaðarprísurin á rakstraruppgávum verður kendur og sambæriligur* |
| *Uppgávur, sum stovnurin ella kommunan ikki fær framt sjálv, verða framdar* |
| *Øki og verkløg kunnu mennast og fornýggjast* |
| *Stovnurin verður mentur, bæði innanhýsis og viðvíkjandi arbeiðshættum* |

## Virksemið í Íslandi

Landverk vitjaði í februar í 2020 í Íslandi. Endamálið var millum annað at kunna samanbera vegamyndugleikan í báðum londunum og viðgera íslendska arbeiðsháttin við viðlíkahaldi og vetrarhaldi.

Í ávísan mun kunnu føroysk viðurskifti og avbjóðingar í vegakervinum samanberast við tey íslendsku, tí bæði veðurlag, undirstøðukervi og mentan minna um hvørt annað. Tó eru munir millum londini, tí støðdin á londunum og harvið vegalongdin eru ymiskar. Ísland hevur nógv fleiri kilometrar av vegi, nógv longri fjarstøða millum vegirnir, og væl meira av kava.

Í Íslandi er vetrarhaldið skipað soleiðis, at Vegagerðin eigur alla útgerð, ið verður brúkt til at salta og kavarudda vegir. Stovnurin keypir inn salt og avgerð nær og hvussu nógv verður saltað, meðan sjálv kavaruddingin verður boðin út til privatar arbeiðstakarar at bjóða uppá.

Hetta er líknandi einari fastari avtalu við ein hýruvogn, ið altíð er tøkur. Samlaða boðið er sett saman av tveimum prísum: ein fastur prísur og ein prís fyri hvørja ferð fólk eru úti og koyra við kavaútgerðini hjá Vegagerðini, tá boð verður sent eftir teimum.

Nakrar av niðurstøðunum hjá íslendingum eru:

- *Tað er ikki ráðiligt fyri samfelagið at bjóða alt virksemið út. Hvørki í sambandi við vetrarhald ella viðlíkahald.*
- *Kavarudding verður boðin út, tí at arbeiði er ikki til so nógv fólk um summarið til vanligt viðlíkahaldsarbeiði.*
- *Vegagerðin hevur eftirlit við kavaruddingarskipanini, fyri at vissa skal vera fyri, at vetrarhaldið og viðlíkahaldið av vegunum verður rikið eftir ásettu krøvunum.*
- *Fólk eru sett til vanligt viðlíkahald, meðan nýgerð av vegum og endurasfaltering ella yvirflatuviðgerð verða boðin alment út.*
- *Sambært Vegagerðini er góðskan av arbeiðnum, sum arbeiðstakararnir gera, á nøktandi støði.*

- *Mett verður ikki at tað eru nóg nógvir privatir arbeiðstakarir, ið vísa áhuga og tí verður kappingin ikki nøktandi. Við fleiri møguligum arbeiðstakarum, tess betri er marknaðurin fyri, og tað er lættari at fáa arbeiðstakararnir at fylgja teimum treytum, ið eru í sáttmálunum.*

Eftirlit, fráboðan og bøtur, um arbeiðið ikki verður gjørt nóg væl, tryggjar, at arbeiðið er framt á nøktandi hátt. Umsiting av sáttmálum er í hesum sambandi alneyðug. Afturat eftirliti og umsiting av vetrarhaldinum, eigur Vegagerðin, sum áður nevnt, bæði salt og útgerðina, sum verður sett á bilarnar hjá arbeiðstakarunum.

Hetta, tí tað verður mett at vera tað besta fyri varðveitslu og viðlíkahaldsstøðu av útgerðini, og viðvíkjandi salti, er tað fyri at tryggja, at eingin ovurnýtsla fer fram til frama fyri vinning hjá arbeiðstakara. Tað eru ikki bert kavadagarnir, ið eru við í sáttmálunum. Samsýning fyri at vera í tilbúgvingarstøðu er ein stórur partur av kostnaðinum – har Vegagerðin skal gjalda fyri at fólk og maskinur eru í bíðistøðu, til brúk er fyri teimum at rudda kava.

## Danmark, Noregi, Svøríki og Bretland

Útbjóðing er ikki eitt endaligt skipað amboð, sum í einum líki treytaleyst kann setast í verk uttan at verða sett í ein ávísan samanhang[1]. Søgan um útbjóðing í Norðurlondum og Stórabretlandi vísir greitt, at tað tekur tíð at tillaga seg, soleiðis at útbjóðingartilfarið er so rættvísandi sum gjørligt í mun til kostnað og góðsku. T.d. hvussu gjaldið skal verða fyri fólk og maskinur í bíðistøðu, og tá tað er aktiv kavarudding.

Kanningin, sum víst verður til, vísir at yvirskipað er í miðal lítil sparing í rakstrarútreiðslum farin fram, tó eru øki, serliga í Noregi, har almenna útboðið ikki hevur betrað um rakstrarútreiðslurnar. Størsta sparingin fer fram fyrstu ferð, tað verður bjóðað út. Tað sæst í svarunum hjá vegastovnunum, um broytingar hava verið á rakstrarútreiðslunum (ibid.).

Miðalsparingin við fyrstu útbjóðing er 11,4 prosent, meðan miðalsparingin fyri triðju og fjórðu útbjóðing er undir 4 prosent. Sparingin kann minka orsakað av, at við tíðini kann talið av møguligum arbeiðstakarum fækka, tí langtíðarsáttmálarnir eru áralangir og arbeiðstakarir fara úr marknaðinum, og krøvini kunnu við tíðini eisini herðast frá arbeiðstakarum, ið hava uppgávurnar um hendi (ibid.)

Ein orsøk til stóru miðalsparingina, kann sambært kanningini hugsast at vera at arbeiðstakarir hava ikki stórvegis royndir í tí arbeiði, sum skal gerast, og krevja tískil ikki fullan prís fyrstu ferð boðið verður út. Men við tíðini styrkist leikluturin hjá arbeiðstakaranum, og eru fáir sum bjóða, kann lægsta tilboðið hækka fyri hvørt útboð.

## Í føroyskum samanhangi

Avleiðingarnar av at bjóða rakstrar-, viðlíkahalds- og vetrarhaldsuppgávur út í Føroyum eru heldur ókendar, men fakligu metingarnar hjá Landsverki við støði í royndum aðrastaðni vísa, at í føroyskum samanhangi er fíggjarlig fortreyt einsamøll ikki haldbar.

---

1 Lindholst, A.C. (2017). INOPS Sammenfatning: En undersøgelse af formål, organisering og resulter med udlicitering af park- og vejdrift i Danmark, Sverige, Norge og Storbritannien. Aalborg: Department of Political Science, Aalborg University.

Landsverk metir at kunna finna eina sparing á uml. 1 mió. kr. tað fyrsta árið, men síðani minkar sparingin og leggur seg á áleið sama støði, sum áðrenn. Vandi er tó eisini fyri, at eingin sparing verður, júst sum millum fleiri kommunur í Noregi.

Ein onnur høvuðsfortreyt fyri útbjóðing er tænasta og góðska. Landsverk hevur, sum er, sera góða góðsku á vetrarhaldinum og góða, men ikki fult so góða góðsku á viðlíkahaldinum. Hagtøl hjá Landsverki vísa, at tað eru sera fáir tímar og dagar um árið, har almennu vegirnir í Føroyum ikki eru farbarir.

Tey trý Norðurlondini, Danmark, Noregi og Svøríki, sum støðið verður tikið í hesari umrøðan av útbjóðing, vera ofta mett at minna um hvørt annað á nógvum økjum, og londini spegla sær oftani í hvørjum øðrum, tá ræður um samfelagsmenning og skipan av tí almenna.

Føroyar og Bretland eru meira ólík, men av tí, at landið hevur langa siðvenju við at bjóða út, er áhugavert at hyggja hyggja nærri at teirra royndum. Til samanberingar kann nevnast, at Bretland byrjaði at bjóða út viðlíkahald av vegum í áttatiárunum, meðan Noreg ikki byrjaði fyrr enn í nullunum.

Bretland hevur sum nevnt bestu royndirnar og hægsta nøgdsemið, tá ræður um útbjóðing, meðan Noregi bæði hevur fægstu royndir og lægsta nøgdsemi.

Avbjóðingar eru eisini, tí arbeiðstakarar tykjast ikki altíð at vera áhugaðir í smærri vegum við minni ferðslu. Tað ber ikki til at niðurraðfesta fjarskotnu økini, tá man hevur eina skyldu at vara av øllum veganetinum. Føroyar eru eitt oyggjasamfelag, og tí skulu arbeiðstakarar og maskinur vera á øllum oyggjum og kunnu koma til allar fjarskotnar leiðir, sum hava tørv á vetrarhaldi.

### Niðurstøða viðvíkjandi útbjóðing av landsvegahaldi og/ella vetrarhaldi

Eftir at hava viðgjørt spurningin um útbjóðing av landsvegahaldi og/ella vetrarhaldi við støði í samanberingum við grannalond, so metir Landsverk at landsvegahald og vetrarhald skal halda fram sum nú við teimum rakstrarligu tillagingum, ið verða framdar.

Tó eigur man at venda aftur til spurningin um útbjóðing við millumbilium, fyri at vita, um onnur viðurskfiti fara at gera seg galdandi, ella um marknaðurin broytist.

# LEIKLUTURIN SUM BYGGIHARRI

Fyri Landsverk er tað av stórum týdningi at taka í egnan barm og staðfesta, hvørjar orsøkirnar eru fyri, hví stórar verkætlanir eru farnar av kós. Hetta er alneyðugt, tí samfelagsligu avleiðingarnar eru stórar, og avleiðingarnar raka bæði politiska landslagið og avvarðandi stovnar meint. Slíkar støður máða alvarsliga av álitinum á Landsverk.

Neyðugu átøkini kunnu bara koma for seint. Sum byggiharri av stórum almennum byggiverkætlanum skal Landsverk tryggja, at almennur peningur verður nýttur rætt og so

skynsamt sum gjørligt. Tað er tí, at uppgávan hjá Landsverki í dag og frameftir, er at taka ábyrgdina á seg, sum ein skikkaður byggiharri. Ein byggiharri, sum hevur tamarhald á og leiðir verkætlanina frá byrjan til enda.

Politiski myndugleikin raðfestir nýtsluna av almennum pengum fyri borgaran. Politiska skipanin stingur út í kortið, raðfestir og tekur avgerðir um, hvørjar verkætlanir skulu fremjast. Men tilgongdin frá politisku avgerðini til, at spakin er settur í og verkætlanin er liðug, hevur ikki verið nóg góð.

Tað hevur týdning, at øll ið eru partar av verkætlanum skilja og vita, hvat tey eru sett til at vera partur av, áðrenn lagt verður frá landi. Tað er ein sannroynd at í einari og hvørjari verkætlan eru nógv viðkomandi ynski og atlit, sum í størri og minni mun eru avgerðandi fyri verkætlanina. Tað er mangan ein torfør uppgáva at raðfesta og taka avgerðir um, hvat skal við og hvat ikki skal við.

Landsverk vil skipa eina verkætlanarleiðslu, sum í størri mun tekur hædd fyri, hvat hendir í øllum liðum á verkætlanartilgongdini. Týdningarmesta broytingin er, at størri dentur verður lagdur á fyrireikingina.

Sum strikumyndin niðanfyri vísir, so er tað áðrenn byggingin er farin í gongd, at tað er møguleiki fyri at avgera, hvør kostnaðurin er. Tí, um fyrireikingararbeiðið ikki er fullfíggjað, og allir partar ikki eru samdir um, hvat byggiskráin inniheldur, er verkætlanin dømd at miseydnast.

Hetta eru altjóða viðurkend viðurskifti.

Mynd 9




Frá Professionelle bygherrers kompetenceudvikling, rapport hjá Byggeherreforeningen, s. 12

Hóast strikumyndin kann tykjast provokerandi í sínum einfaldni, so lýsir hon sera væl avbjóðingarnar og torføru samráðingarnar, sum eru neyðugar, áðrenn farið verður í gongd. Tí veruleikin er, at tær krónurnar, sum skulu brúkast, verða brúktar, áðrenn farið verður í gongd.

Tað er í teimum fyrstu stigunum, at størstur vandi er fyri, at verkætlanir fíggjarliga og á annan hátt fara av kós. Tí skal byggiharrin tryggja sær, at verkætlanin er nóg væl fyrireikað, áðrenn hildið verður fram við verkætlanini.

Kaldi veruleikin er, at fyrireikingin hevur tíverri ikki altíð verið raðfest nóg høgt. Her spæla fleiri viðurskifti inn:

- *Mótspælið til tey, ið gera verkætlanina klára at bjóða út, hevur ikki verið nóg gott.*
- *Leikluturin hjá bygginevndini hevur ikki verið nóg væl lýstur og skilmarkaður.*
- *Ynski og krøv, sum koma frá bygginevndunum, hava ikki verið neyvt kostnaðarmett og árinskannaði, áðrenn tey eru tikin inn í verkætlanina.*
- *Bygginevndin hevur ikki í nóg stóran mun havt ábyrgd av at halda seg innanfyri ásettu kostnaðarætlanina.*

Landsverk hevur helst ikki lagt nóg stóran dent á at bróta niður fatanina um, at tað er ikki bert í sjálvum byggitíðarskeiðinum, at ansast skal serliga væl eftir, at ein byggiverkætlan ikki fer av kós.

Veruleikin er beint øvugtur, tí tað er í fyrireikingini, at byggiharrin skal vera serliga eftiransin og fylgja við í, hvussu verkætlanin verður handfarin.

Tað er tí av alstórum týdningi, at Landsverk sum byggiharri er tilvitað um, at tað einans er hann, sum stendur til svars fyri ánaranum. Tað er byggiharrin, sum skal syrgja fyri, at játtaði peningurin verður nýttur skynsamt og at fíggjarkarmurin heldur.

Tí er tað eisini uppgávan hjá byggiharranum at vera týðuligur við ráðgevarar og teir aktørum, sum annars eru partar av verkætlanini. M.a. hetta er málið við teimum átøkum, ið nú verða framd.

### Sjónligt og greitt ábyrgdarbýti

Tað er til tíðir ein avbjóðing at greina, hvussu ábyrgdarbýtið er, og hvar avgerðarrætturin í eini verkætlan liggur. Sum vanligt er í verkætlanum og bygging, so koma tvístøður, ið krevja at støða má takast til:

- *Stødd.*
- *Kostnað.*
- *Góðsku.*

Landsverk strembar, sum helst allir aðrir byggiharrar, altíð eftir, at øll trý punkt verða gingin á møti á nøktandi hátt, men hetta ber jú ikki altíð til. Tvístøður stinga seg ofta upp í fyrireikingini, í prosjekteringini, og meðan sjálv byggingin er farin í gongd.

Tað er ein avbjóðing at fáa allar partar, eigara, brúkara og byggiharra, at semjast um hvørji átøk mugu gerast, og tað vísir seg mangan trupult at fáa partarnar at tillaga síni krøv.

Hesar samráðingar hava víst seg at vera alt ov truplar og tíðarkrevjandi. Tískil er neyðugt, at tilgongdin verður gjørd einfaldari og smidligari.

Landsverk mælir tískil til, at ein stýrisbólkur verður settur yvir hvørt stovnsnummar, ið fær fullan avgerðarrætt, at taka støðu til tey tilmæli, ið verða send teimum. Stýrisbólkurin, sum er mannaður við eigara av ræðisrætti yvir játtanini og stjóra á stovni við dispotiónsrættinum av játtanini, vísir beinleiðis til aðalstjóra og landsstýrismann á økinum.

Niðanfyri sæst uppskot til bygnað og ábyrgdarbýti. Sum støðan er í dag, so ferð alt ov nógv tíð, ið hevur kostnað við sær, hjá øllum pørtum um at semjast um stødd, kostnað og góðsku.

Mynd 10




# Stýring av stórum verkætlanum

Síðani 2001 hevur Landsverk vegna Føroya Landsstýri umsitið byggimál og onnur øki, ið hava við bygging at gera. Úrslitini av hesi umsiting hava verið misjøvn gjøgnum árini, men serliga verkætlanin at byggja Skúladepilin í Marknagili hevur kravt eina neyva sjálvrannsakan av Landsverki.

Í arbeiðnum at eftirhyggja leiklutin hjá Landsverki eru munandi lýti staðfest í mannagongdum, eftirliti, váðametingum og atburði hjá Landsverki. Í tí fylgjandi verða hesi viðurskifti lýst nærri og batar umrøddir. Men umframt hesi lýti kann eisini sigast, at um størri verkætlanir, har Landsverk hevur leiklutin sum byggiharri, skulu eydnast betri, er neyðugt at verkætlanirnar og fíggjarkarmarnir passa betri saman.

## Manglandi fíggjarstýring

Hóast Landsverk nýtir skipanirnar hjá Gjaldstovuni, sum hevur um hendi yvirskipaðu bókhalds- og roknskapar uppgávur landsins, eru innanhýsis viðurskifti, ið hava borið við sær, at greiningarnar hjá Gjaldstovuni ikki hava víst eina rætta mynd av roknskapunum á verkætlanum. Tvær orsøkir eru til tess:

- *Verkætlanarleiðarar hava í hvør sínum lagi stýrt fíggjarviðurskiftunum á verkætlanum, uttan at hetta hevur verið sjónligt í skipanunum hjá Gjaldstovuni.*

- *Landsverk hevur ikki framt eitt nøktandi internt fíggjareftirlit við verkætlanum. Hetta hevur gjørt, at tað í stórum verkætlanum, sum hava strekt seg yvir fleiri ár, hevur verið møguligt at flutt eina møguliga meirnýtslu fram, uttan at hetta er vorið sjónligt í landsroknskapinum ella á Landsverki. Hendan mannagongdin er nú broytt.*

Í dag heldur Fíggjardeildin á Landsverki neyvt eyga við verkætlanum og teimum rokningum, ið liggja í rokningsverkgongdini. Um semja ikki er um upphæddina á rokningunum, skulu tær bókast inn og avsetast, so skipanin hjá Gjaldstovuni til eina hvørja tíð vísir ein rættan roknskap. Mánaðarroknskapir verða gjørdir og avstemmaðir við Gjaldstovuna.

Tað, at starvsfólk og leiðslur ikki hava hildið seg til rættar innanhýsis mannagongdir, hevur alt virkað til, at tølini í roknskapinum hava víst eina skeiva mynd, og tí hevur kunning við støði í hesum aloftast verið ófullfíggjað. Eisini hetta er í dag broytt.

## Leiðin fram

Leiðslan á Landsverki leggur stóran dent á, at tær skipanir, ið Landsverk nýtir í dag, neyvt verða fylgdar og gerast ein samvirkin partur av verkætlanartilgongdini. Hetta arbeiðið er sett í verk, og tað koyrir eftir ætlan.

Neyvt tilknýti er í dag millum Fíggjardeildina og Byggideildina á Landsverki, so ein nøktandi fíggjarstýring verður tryggjað frá byrjan til enda á øllum verkætlanum.

Í arbeiðnum at eftirhyggja Landsverk standa trý høvuðsøki fram, sum aftur og aftur hava víst seg ikki at hava verið avgreidd á einum nøktandi støði. Hesi trý øki eru øll sera týðandi, skulu verkætlanir eydnast.

Høvuðsøkini eru:

- *Fullfíggjað fyrireiking*

- *Leypandi váðameting*

- *Neyv fíggjarstýring*

Einfalt sagt, so hevur manglandi ábyrgd á hesum høvuðsøkjum havt við sær tær ógvusligu samfelagsligu avleiðingar, sum vit hava sæð seinnu árini. Niðanfyri verður lýst, hvat Landsverk leggur í hesi trý høvuðsøki.

### Fullfíggjað fyrireiking

Ferð eftir ferð hevur Landsverk staðfest, at verkætlanir eru settar í verk uttan at hava verið fyrireikaðar til fulnar. Verkætlanir dýrka, og tilgongdin er merkt av, at ov long tíð gongur, tørvurin verður ikki tæntur, og álitið millum partarnar slítist. Av hesum orsøkum er fullfíggjað fyrireiking í veruleikanum tað mest týdningarmikla økið.

Sum dømi kunnu nevnast:

- *Virknis- og Umlættingardepilin í Sandoynni – Sæð úti frá tyktist verkætlanin at vera eydnað, men neyðugt var við umbyggingum, eftir at byggingin var meira enn hálvliðug, tí ánari, brúkari og byggiharri ikki vóru samd um, hvat virksemi skuldi inn í bygningin.*
- *Sambýlið á Blikagøtu – Ein verkætlan, har nógv varð spart burtur fyri at kunna seta hol á byggingina. Umbyggingar máttu gerast, eftir at byggingin var so gott sum liðug fyri at húsa teimum borgarum, ið skuldu búgva har. Seinni hava aðrar avbjóðingar víst seg, eitt nú eru ikki nøktandi umstøður uttandura, ið kunnu hava óhepnar avleiðingar fyri brúkaran.*
- *Skúladepilin í Marknagili – Ein verkætlan har eigari, brúkari og byggiharri ongantíð vóru nær námind hvørjum øðrum, hvat viðvíkir tørvi, góðsku og kostnaði.*
- *Landssjúkrahúsið, H-bygningurin – Aftur her endurtekur søgan seg, at bygging er byrjað uttan at eigari, brúkari og byggiharri eru samd um tørv, góðsku og kostnað.*

Felags fyri verkætlanirnar er, at eigari, brúkari og byggiharri ikki hava framt eina nøktandi fyrireiking, og hevur hetta havt óhepnar fíggjarligar og funktiónellar avleiðingar.

### Landsverk vil taka ábyrgdina á seg

Landsverk hevur longu lagt á annan bógv, eins og hetta verður galdandi framyvir:

- *Landsverk mælir framyvir frá, at verkætlanir, ið ikki eru nóg væl fyrireikaðar, verða settar í verk. Landsverk vil tryggja, at øll funktionell krøv og ynski eru tikin við og viðgjørd, so øll fíggjarlig árin eru neyvt lýst.*
- *Nýggi verkætlanarleisturin hjá Landsverki er samsvarandi við royndir og mannagongdir, sum almennu byggiharrarnir í grannalondum okkara hava sett í verk. Fleiri av hesum átøkum eru tikin við í nýggja verkætlanarleistin hjá Landsverki.*

Tá talan er um fullfíggjaða fyrireiking, er neyðugt at gera sær greitt, at talan er um stórt og víðfevnt arbeiði. Tað er av stórsta týdningi, at hóskandi tíð verður sett av til eina torgreidda tilgongd, óvissur, og møgulig frávik í tí, sum skal fyrireikast.

### Kostnaðarmetingar mugu grundast

Hóast allar verkætlanir eru bundnar av tøkum peningi og játtan, so er tað ikki ráðiligt fyri eina verkætlan at kostnaðarmetingar verða ásettar ov tíðliga í tilgongdini, uttan at vavið av uppgávuni og virkislýsingin er nóg væl lýst.

Fullfíggjaða fyrireikingin tryggjar, at byggiharri, eigari, brúkari og politiska skipanin kenna seg trygg og nóg væl upplýst um, hvat liggur innan fyri verkætlanaravkláringina, og hvat játtanin verður nýtt til.

Ein fullfíggjað fyrireiking tryggjar verkætlanarleiðslu, byggileiðslu, ráðgevum og arbeiðstakarum eitt væl upplýst grundarlag at arbeiða eftir. Hetta setir natúrliga spurningin:

*Hvussu tryggjar man so eina fullfíggjaða fyrireiking, tí givið er, at ongar verkætlanir eru heilt eins?*

Fleiri støður skulu takast í teimum mongu stigunum í fyrireikingini. Eigari og brúkari skulu tíðliga í tilgongdini taka støðu til tørvin og góðskuna. Hesar støðutakanir hava alstóra ávirkan á, hvussu verkætlanin framhaldandi skal handfarast.

Á næstu síðu sæst, hvussu ein verkætlan við ráðgeving, prosjektering, útboði, bygging og eftirliti vanliga verður býtt upp í 12 stig.

Mynd 11




## Virkislýsingin hevur alstóran týdning

Fyri byggiharran hevur tað alstóran týdning at virkislýsingin er avgreidd. Tí hvussu kann byggiharri, bygningsánari, bygningsbrúkari og politiska skipanin semjast um innihaldið á verkætlan, góðsku og kostnaði, um allir partar ikki eru samdir um, hvat verkætlanin skal innihalda?

Sum ein einføld, men sigandi lýsing av, hvussu týdningarmikil fyrireikingarstigini eru, ber til at samanbera eina unga familju, ið ynskir at fáa egið tak yvir høvdið, men í mesta lagi hevur 2,5 mió. krónur at byggja fyri.

Tað gevur onga meining at fara undir eina bygging, um ein frammanundan veit, at húsini fara at kosta minst 4 mió. krónur, ella eina munandi hægri upphædd enn ta upphæddina, sum familjan hevur at byggja fyri.

Byggiharrin – í hesum føri familjan - má sjálvandi gera øllum aktørum púra greitt, at tey ikki hava meira enn ásettu upphæddina, tí annars kemur hon sær í óføri.

Hetta einfalda dømið lýsir væl avbjóðingina, sum Landsverk og almenni myndugleikin hevur at tryggja sær at samsvar er millum tøkan pening og tørv. Landsverk vil framyvir taka sína ábyrgd sum byggiharri í størsta álvara, og tryggja at stødd, góðska og kostnaður sampakka við tað, ið er avtalað.

Í summum førum kann loysnin vera ein heildararbeiðstøka, sum er lættari at umsita, ella í hvussu so er at royna at býta verkætlanina í færri og størri útboð.

### Leypandi váðametingar

Meðan verkætlanarlýsingin verður framd, og í allari verkætlanini, hava leypandi váðametingar stóran týdning. Váðametingarnar skulu greitt lýsa, hvørjar avleiðingar allar avgerðir hava á kostnað, tíð og góðsku. Tað er ábyrgdin hjá Landsverki at tryggja, at váðametingar verða gjørdar, og at hetta er ein samvirkin partur í allar verkætlanartilgongdini.

Váðametingar hava til endamáls at tryggja, at allir partar, ið vara av verkætlanini skilja, hvat verður valt frá og til, og hvørja ávirkan hesi val hava á góðsku, virkisføri, tíð og kostnað.

Í undanfarnum verkætlanum sæst greitt, at leypandi váðametingar ikki hava verið gjørdar. Avleiðingin av manglandi váðametingum er millum annað, at allir partar ikki hava verið greiðir yvir, júst hvørjar avleiðingar teirra val seinni hava havt á verkætlanina.

Ein váðameting er meira enn ein kunning. Hon skal nýtast sum eitt amboð, ið tryggjar, at tíð, góðska, virkisføri og kostnaður rúmast innan fyri givna játtan.

Av tí, at allar verkætlanir kunnu broytast nógv meðan tær verða fyrireikaðar, og bygging er í gerð, krevst, at váðametingar verða gjørdar leypandi, so atlit verða tikin til allar hugsandi broytingar, ið kunnu koma.

Í fíggjarstýringini av fleiri farnum verkætlanum hava vit staðfest, at tøl og upplýsingar hava ikki verið skrásett í skipanir. Tað er neyðugt at alt virksemi, allar eindir, tænastur og alt tað, ið kostar pengar, verður skrásett í váðametingarskipanir. Hesi viðurskifti, sum ikki eru í skipanini, eru millum høvuðsorsøkirnar fyri, at alt gongur galið. Við neyvari verkætlanarleiðslu, har øll tilgongdin er kend bæði aftureftir og so vítt møguligt frameftir, ber til at viðgera óvissur so skjótt, tær vísa seg.

Stórur dentur verður lagdur á menningina av einari virkisførari váðameting. Tað merkir, sum lýst í partinum um Starvsfólkadeildina, at allir verkætlanarleiðarar og starvsfólk við ábyrgd á Landsverki verða skúlaði í at eyðmerkja og skráseta øll viðurskifti, sum kunnu hava við sær váða fyri verkætlanir.

Umframt at halda neyvt eyga við kostnaðinum á øllum tilfari, arbeiðsmegi og øðrum viðurskiftum, sum hava beinleiðis ávirkan á kostnaðin av eini verkætlan, so merkir ein neyv váðameting eisini, at ansast skal eftir viðkomandi broytingum í bæði innanlands og altjóða samfelagnum.

Í undanfarnum verkætlanum hava í ávísum førum verið gjørdar váðametingar. Í ávísum førum hava tær víst á váðar, ið ikki hava gjørt tað møguligt at fylgja politiska viljanum. Heldur enn at fylgja teimum fýra grundleggjandi stigunum í eini váðameting, ið eru:

- Staðfest váða.
- Greina váða.
- Legg til rættis.
- Frem og fylg upp.

So hevur man valt at laga seg eftir politisku ynskjunum uttan at lýsa váðarnar á nøktandi hátt fyri politisku skipanini. Hetta hevur havt sera óhepnar fylgjur við sær. Sum dømi kann nevnast Glasir.

## Neyv fíggjarstýring

Tað er sjálvsagt, at neyv fíggjarstýring krevst, um ein verkætlan skal halda kostnað. Innleiðandi vóru nevnd átøk, ið Landsverk longu hevur sett í verk fyri at tryggja, at støður, ið Landsverk kom í á heysti 2018, ikki endurtaka seg.

Fyri at hava eina neyva fíggjarstýring á einum stovni við fleiri starvsfólkum, krevjast eins mannagongdir og hesar eru nú settar í verk.

Týdningarmestu átøkini fyri at tryggja eina betri fíggjarstýring framyvir eru hesi:

- *3. parts eftirlit – Verkætlanarleiðari stýrir fíggjarstýringini og hevur eftirlit við, at alt verður ført inn í fíggjarstýringsskjalið og skipanina hjá Gjaldstovuni. Deildarleiðarin hevur støðugt eftirlit við, at verkætlanarleiðarin fylgir ásetingunum. Fíggjardeildin hevur evsta eftirlit við verkætlanar- og deildarleiðara og kunnar bæði stjóra og deildarleiðara um fíggjarstýringina.*
- *Allar útreiðslur og inntøkur skulu skrásetast í SEYF og leggjast inn í fíggjarstýringsskjalið. Rokningar kunnu ikki váttast og leysgevast, um tær ikki eru skrásettar í SEYF.*
- *Fíggjarstýringsskjalið verður avstemmað við skipanina hjá Gjaldstovuni einaferð um mánaðin.*
- *Fullfíggjaður mánaðarroknskapur/byggiroknskapur skal latast leiðslu á Landsverki einaferð um mánaðin.*

- *Kostnaðarmetingar skulu gerast og vera í samsvari við veruleikan á arbeiðsmarknaðinum.*
- *Leypandi váðametingar skulu gerast, allir kostnaðir og prísir skulu dagførast, ið taka hædd fyri øllum broytingum og prísur verður sett á hesar broytingar í verkætlanini, umframt broytingum á marknaðinum og viðkomandi broytingum innanlands og í altjóða samfelagnum í síni heild.*

Nýggja fíggjarstýringsskipanin hevur til endamáls at skapa rætta opinleikan í skipanini, soleiðis at øll við ábyrgd av verkætlanini og innliti í skipanina hjá Gjaldstovuni hava møguleika fyri at fylgja við í fíggjarviðurskiftunum á eini verkætlan.

Tá stórur dentur verður lagdur á, at virkislýsingin er fult avgreidd áðrenn farið verður í gongd, er tað sjálvsagt, at allir viðkomandi partar fáa fylgt væl við, hvussu arbeiðið gongur.

## Greiðari ábyrgdarbýti ásetast

Av gjørdum mistøkum hevur Landsverk longu av álvara strammað upp í sambandi við at seta í gongd nýggjar verkætlanir. Landsverk hevur fyribils steðgað tveimum verkætlanum, tí ov stórur munur var millum ætlaðu verkætlanina og fíggjarkarmin, sum roknast kundi við, at politiski myndugleikin fór at áseta.

Skal hetta broytast, so má virkislýsingin greitt lýsa, hvussu verkætlanin er samansett. Hetta soleiðis, at bygginevndin, sum í tilgongdini kann koma við øðrum og nýggjum ynskjum, verður gjølla kunnað um avleiðingar í bæði tíð og fígging, og um tað liggur innanfyri fíggjarkarmin. Tað er nevniliga ein viðkomandi spurningur, hvør ítøkiliga skal handfara nýggj ynski í eini verkætlanartilgongd.

Mannagongdirnar innan stórar verkætlanir, sum eru lýstar omanfyri, leiða fram til tann leistin við greiðari ábyrgdarbýti, sum Landsverk ynskir at arbeiða fram ímóti. Tað er av størsta týdningi í einari og hvørjari verkætlan, at tað er heilt greitt hvat skal byggjast, hvussu loysnin skal skipast og hvat tað skal kosta. Ella fyri at endurtaka punktini omanfyri, so mugu hesi viðurskifti avgreiðast:

- *Stødd.*
- *Kostnaður.*
- *Góðska.*

Tað er av størsta týdningi, at ein endalig niðurstøða fæst um hesi viðurskifti, soleiðis at byggingin kann leggjast neyvt til rættis.

## Nýggj verklagsfígging vil betra um úrslitini

Tá lagt verður upp til at stórur dentur skal leggjast á fyrireikingina av verkætlanum, so er fíggingarleisturin, sum er ein neyvt atknýttur partur, verdur at umrøða. Landsverk vil við hesum mæla til, at leisturin fyri hvussu verkætlanir verða fíggjaðar verður tillagaður, soleiðis at størri dentur formelt verður lagdur á júst fyrireikingina.

Sum áður nevnt er  fyrireikingin týdningarmesta tíðarskeiðið í eini verkætlan. Tískil verður lagt upp til at hetta gerst ein natúrligur partur av fíggingini av øllum komandi verkætlanum. Niðanfyri sæst eitt uppskot um nýggja verklagsfígging, har hædd verður tikin fyri fyrireikingartíðarskeiðinum í einum fíggjarligum høpi.

Nýggi leisturin, sum mælt verður til, hevur tríggjar høvuðstættir:

***Fullfíggjað fyrireiking***
*10% av samlaðu játtanini til verkætlanina verða oyramerkt og brúkt til eina fullfíggjaða fyrireiking.*

***Mongd ferðir eindarprís***
*Fullfíggjaða fyrireikingin leggur grundarlagið undir grundleggjandi útrokningini av mettu útreiðslunum av verkætlanini. Mongdir og eindarprísir taka støði í væl skjalprógvaðum fortreytum.*

***10% omaná í møguligum óvissuískoyti***
*Tíggju prosent verða løgd oman á metta grundkostnaðin. Óvissuískoytið skal fíggja óvissur og frávik, sum til dømis skiftandi prísir, verkætlanarbroytingar og broytingar í mongdum. Hetta ískoyti er bert til at fíggja óvissur og skal ikki fíggja sjálva grundverkætlanina. Óvissuískoytið kann einans brúkast til skjalprógvaðar óvissur, sum ikki kundi leggjast upp fyri. Landsverk hevur ikki atgongd til hesa játtan, uttan umsókn til avvarandi aðalráð.*

Mynd 12



### Niðurstøða og tilmæli

Niðurstøðan viðvíkjandi leiklutinum hjá Landsverki, tá tað snýr seg um leiklutin sum byggiharri og stórar verkætlanir eru hesar:

Landsverk vil fyri eina og hvørja verkætlan tryggja, áðrenn nakað verður byrjað, at hon kann setast ígongd fyri tann fíggjarkarm, sum er ásettur.

Landsverk mælir harumframt til at hesi átøk verða sett í verk:

Heitt verður á Landstýrið at tryggja, ella broyta siðvenju, soleiðis at ráðini gera síni krøv galdandi í byrjanini av stórum verkætlanum, tá virkislýsingin verður gjørd, fyri síðani at lata Landsverk røkja sína uppgávu sum byggiharri, uttan at ógreitt er, hvør situr við ábyrgd og ávísingarrætti í verkætlanum. Ábyrgd og heimildir mugu fylgjast at.

Mælt verður til, at man broytir verklagsfíggingina, soleiðis, at 10% verða avsett til fullfíggjaða fyrireiking av verkætlanini. Harafturat er okkara tilmæli, at 10% verða løgd omaná sum óvissuískoyti. Hetta ískoyti skal bert gjaldast út eftir umsókn við frágreiðing, um tað gerst relevant fyri eina verkætlan.

# UMSITING AV ALMENNUM BYGNINGUM



Umsitingin av landsins bygningum liggur hjá Landsverki, og eru tað starvsfólk við servitan innan viðlíkahald, ið hava umsitingina um hendi. Stovnurin ynskir at nýta hesa vitan á besta hátt og vera ein proaktivur almennur stovnur, soleiðis at brúkarin av bygningunum fær bestu umstøður at virka

undir. Landsverk hevur ábyrgdina av, at bygningarnir eru virknir, tryggir og kunnu rúma tí virksemi, ið húsast ella fer at húsast har.

Landsverk vil, sagt í stuttum, at allir landsins bygningar skulu vera:

- *Í góðum standi.*
- *Orkuvinarligir.*
- *Fult virkisførir.*
- *Bíligir í rakstri.*
- *Góðir at uppihalda seg í.*
- *Tillagaðir til virksemið hjá brúkarunum.*

Landsverk leggur stóra orku í, at reka landsins bygningar, men uppgávan er stór. Landið eigur umleið 250.000 fermetrar av bygningum og leigar aðrar 40.000 fermetrar fyri góðar 40 milliónir krónur árliga. Landsverk hevur yvirlit yvir landsins ognir og leigumál, og stovnurin ynskir størri heimildir í sambandi við rakstur av hesum.

Sum støðan er nú, er tað ein stór avbjóðing at røkka uppgávuna. Við tí úrsliti, at fleiri bygningar hjá landinum fella í órøkt við óhepnum avleiðingum fyri bæði brúkara og landið, sum eigara. Tað ber altíð til at kjakast um, hvørt játtanin til viðlíkahald er ov lítil, men Landsverk vil í hesi frágreiðing heldur leggja dent á nøkur viðurskifti, sum kunnu leggja umsitingina av almennum bygningum í eina tryggari legu:

Avbjóðingarnar verða her lýstir undir trimum høvuðsbólkum:

- *Óskipað nýtsla av fermetrum.*
- *Ovurnýtsla av orku.*
- *Manglandi viðlíkahald.*

Hesar tríggjar avbjóðingar eru neyvt knýttar saman og í tí fylgjandi vilja vit legga fram uppskot, sum kunnu skipa umsitingina av almennum bygningum betri.

### Ræðisrætt til frama fyri betri umsiting

Eingin samskipan er í dag millum stovnar um skynsama gagnnýtslu av fermetrum. Tað er í dag eingin sjálvfylgja, at ein stovnur, sum ræður yvir fleiri fermetrum, enn stovnurin hevur brúk fyri, hevur hesar tøkar til ein annan stovn, sum manglar fermetrar.

Ein partur av avbjóðingini við at fáa rakstur og viðlíkahald av bygningum á hóskandi støði, kann loysast við, at stovnar rinda eitt lítið leigugjald fyri sínar fermetrar. Helst hevði ein sparing verið, um stovnsleiðslur sluppu sær av við óneyðuga nógvar fermetrar, sum kundi húsa øðrum virksemi. Í dag rinda stovnar og aðrir almennir leigarar ikki leigu í teimum bygningum, sum landið eigur. Hinvegin hava aðrir almennir stovnar stórar leiguútreiðslur, har onnur enn landið eiga bygningarnar.

Ræðisrætturin liggur hjá øðrum eigarum, í flestu førum hjá aðalráðum, meðan ábyrgdin at halda bygningarnar viðlíka og reka teir, er á Landsverki. Hetta býtið samsvarar hvørki við tíðina ella við

skynsama umsiting av landsins bygningum. Rættast er, at allir almennir bygningar verða riknir av einum og sama stovni.

Um allir bygningar undir landinum vórðu fluttir til Landsverk at umsita, raðfesta, reka og krevja inn leigu fyri, høvdu bygningarnir altíð kunnað verið í fullgóðum standi. Við einum ræðisrætti yvir umsitingina av bygningunum og leigugjaldi, vildi tað verið ein sjálvberandi skipan, sum tryggjar at peningur er til viðlíkahald.

### Orkutak

Eitt stig rætta vegin er, at koyra meira ferð á verkætlanina Orkutak[2], sum Landsverk fór undir fyri umleið trimum árum síðani.

Endamálið við Orkutak er at finna sparingar við orkuumvælingum av almennum bygningum. Átakið fevnir um orkuátøk í sjálvum bygningunum, so sum at bjálva, skifta orkukeldu, stýringar og annað. Somuleiðis eftir, at átøkini eru framd, at skipa fyri leiðbeining og kunning til lyklapersónar og starvsfólk á staðnum. Málið er, at Orkutøk við tíðini ikki bert skulu fíggja orkusparandi átøk, men eisini geva eitt íkast til vanliga bygningsviðlíkahaldið.

Nógvir av almennu bygningunum hava eina ov høga orkunýtslu til upphiting. Um ætlanin hjá Landsverki viðvíkjandi upphiting skal eydnast, er neyðugt, at peningur verður settur av til at gera orkuábøtur á teir.

Landsverk ynskir at ganga á odda við at fáa gongd á orkuátøk í almennum bygningum og um Landsverk fær ræðisrættin á almennum bygningum, vil tað lætta munandi um møguleikan at seta Orkutøk í gongd og at brúka funnar sparingar til fleiri Orkutøk.

Tað er ein sannroynd, at orkunýtslan í almennum bygningum er alt ov høg. Landsins bygningar brúka í dag yvir 40 milliónir krónur árliga í orku. Landsverk hevur eina orkustýringsskipan, har allir landsins bygningar eru við, sum kann nýtast sum krumtappur í arbeiðnum at minka um orkunýtsluna.

Landsverk vil seta arbeiðsorku av til:

- *At fylgja við orkunýtsluni.*
- *Uppfylging og kanning av frávikum.*
- *Samskifti við ábyrgdarpersónar á stovnum um orkunýtslu.*

Landsverk vil virka fyri og leggur upp til, at tað yvirskipað verður verður orðaður ein orkupolitikkur við ítøkiligum málum fyri orkusparing fyri hvønn einstaka stovn. Her er ráðiligt at taka støði í verandi orkunýtslu í kWh,  sum er skjalfest í orkustýringsskipani.

---

[2] Orkupolitisk ætlan – hvussu vit røkka málunum fram til 2025 og 2030: http://tilfar.lms.fo/logir/alit/2018.06%20Orkupolitisk%20%C3%A6tlan%20-%20hvussu%20vit%20r%C3%B8kka%20m%C3%A1lunum%20fram%20til%202025%20og%202030.pdf

Sparingar frá orkuátøkuverkætlanum skulu sjálvsagt brúkast til átøk innan orkusparing í øðrum bygningum. Landsverk hevur í hesum sambandi góð úrslit at vísa á. Frá 2017 – 2019 vóru nýttar góðar 6 milliónir krónur til 20 ymisk orkuátøk, har árliga orkusparingin frá hesum er ein góð millión krónur í 2019 prísum.

Við Orkutaki er møguleiki fyri at bøta munandi um rakstrarstøðuna á einum bygningi, tí orkunýtslan minkar, umframt at tað eisini lyftir bygningin upp á eitt hægri góðskustøði, bæði í mun til byggitøkniligu- og listarligu góðskuna, inniluft, rakstrarkostnað, útlát og annað.

Umframt at vera lønandi, skilt á tann hátt, at afturberingin frá orkusparandi tiltøkum vanliga fíggja sjálva íløguna, vísa royndirnar hjá Landsverki, at orkusparandi tiltøk skapa eina virðisøking av ognini, sum er umleið líka stór sum sjálv íløgan. Talan er bæði um eina týðandi sparing og virðisøking av bygninginum.

### Dømi um væleydnað átak

Eitt dømi um eina framda orkutakverkætlan er Føroya Landsbókasavn. Her vóru oljufýr og oljutangi gomul og niðurslitin, lekar í vindeygunum, eins og gjóstur var ein stórur trupulleiki. Somuleiðis var ljósútbúnaðurin vánaligur. Hetta er nú alt skift út.

Hitaskipanin er nú ein grøn loysn (hitapumpur), vindeyguni eru nýggj, og ljósútbúnaðurin orkueffektivur og nógv betri. Hetta hevur givið fitta sparing í orkurokningunum, samstundis sum átrokandi viðlíkahald er framt.

Landsbókasavnið er nú ein grønur, orkueffektivur bygningur, ið er góður at verða í hjá bæði starvsfólki og brúkarum. Bygningurin er hugaligari at vera í, og nú síggjast fleiri sita við vindeyga. Landsbókasavnið hevur við hesum átakinum samstundis fingið betri nýtslu burturúr fleiri fermetrum enn áður.

Samlaða íløgan í Føroya Landsbókasavn er uppgjørd til 1,3 milliónir krónur, og samlaða sparingin er umleið 90.000 krónur um árið (2019). Tað merkir, at bygningurin hækkar í virði, gerst meiri virkisførur og allir fermetrar kunnu verða gagnnýttir á nøktandi hátt.

### Manglandi viðlíkahald

Sum lýst omanfyri fella landsins bygningar í órøkt av manglandi viðlíkahaldi. Virðistapið er trupult neyvt at áseta, men ein varislig meting kann áseta miðalvirðistapið at vera 1 prosent árliga. Tá minka almennir bygningar umleið 50-75 milliónir krónur um árið. Hetta sæst ikki í nøkrum roknskapi.

Við omanfyri standandi átøkum við betri umsiting av fermetrum og orkuátøkum framdum í verki, er møguligt hjá Landsverki at fremja sparingar, sum so aftur kann nýtast til onnur átøk. Til frama fyri viðlíkahaldið av bygningum, kann setast í verk ein húsavarðatænasta, ið tekur sær av dagligu viðlíkahaldsuppgávunum á øllum almennum bygningunum.

Umráðandi er við góðum samspæli millum lyklapersónar á teimum einstøku stovnunum innan viðlíkahald og Landsverki. Hetta hevði givið hesum persónunum eitt mennandi arbeiðsumhvørvi, har dentur verður lagdur á at kunna hvønn annan um hugskot og betringar hjá hvørjum øðrum. Samspælið millum átøkini vísir seg í einari loysn, har kravda viðlíkahaldið verður funnið við tí neyva og lágt ásetta leigugjaldinum. 185 krónur fyri fermeturin gevur 46 milliónir krónur um árið og er ein nóg stór upphædd at tryggja viðlíkahald av almennum bygningum, so tað slepst undan at bygningarnir forfella og minka í virði.

## Fyrimunir við átøkunum

Avbjóðingin við at fáa bygningsrakstur og –viðlíkahald á hóskandi støði, kann betrast í smáum, men við nevndu átøkum framd í verki, kann málið verða rokkið.

Tey 20 orkuátøkini, sum Landsverk hevur framt, hava víst seg at vera ein góð íløga í bæði grønari orkuloysnir, men eisini í betri inniklima og virðisøkingar á bygningunum.

Við ræðisrætti og einum kostnaðarásettum leigukostnaði ber til hjá Landsverki, at viðvirka til eina rationalisering av fermetrum, sum landið brúkar.
Sum er ræðir landið yvir 290.000 fermetrum, harav um 40.000 fermetrar eru leigumál. Sparir landið bara 5% í leigaðum fermetrum er sparingin 15 mió. krónur um árið, meðan sparingar í nýtslu av fermetrum, sum landið eigur, kunnu hava við sær, at bygningar kunnu seljast.

Myndin niðanfyri vísir samanspælið millum átøkini, sum skotin verða upp. Verður størri dentur lagdur á Orkutøk, ræðisrætturin verður fluttur til Landsverk og lági leigurkostnaðurin verður ásettur kann køkan broytast uppá fá ár so almennir bygningar verða munandi betri viðlíkahildnir, samstundis sum almennu útreiðslurnar til orku og húsaleigur fara munandi niður.

Mynd 13



Fyrimunirnir við teimum átøkum, sum Landsverk mælir til, kunnu eitt nú vera fylgjandi:

- *Fleiri milliónir krónur spardar við fermetraumsiting og orkutøkum.*
- *Nøktandi viðlíkahald verður tryggjað.*
- *Góður rakstur av tøkniligum skipanum.*
- *Nøktandi inniumhvørvið.*
- *Betri starvsfólkatrivnaður.*
- *Færri sjúkradagar.*
- *Bygningar enda ikki í órøkt.*
- *Eftirsleipið kann við tíðini gerast søga.*

### Niðurstøða, tilmæli og átøk

Landsverk mælir til at fylgjandi tilmæli verða sett í verk:

Mælt verður til, at Landsverk umsitur allar ognir landsins og leigumál. Skipanin í løtuni er í andsøgn við grundprinsippið um at ábyrgd og heimildir eiga at fylgjast at. Ein felags umsiting av ognum, sum vit kenna tað t.d. úr Danmark, hevði tryggjað sparingar og munandi effektivari nýtslu av almennum fermetrum.

Mælt verður til, at almennir stovnar og ráð framyvir gjalda eina lítla húsaleigu fyri tær ognir, ið landið eigur, til viðlíkahald. Mett verður, at 185 kr. pr. fermetur pr. ár, vildi givið 46 milliónir, sum er nóg mikið fyri at sleppa undan virðisminking og viðlíkahaldseftirsleipi. Hetta hevði givið størri gjøgnumskygni í raksturin av almennum stovnum og ráðum.